# ÁRSFRÁGREIÐING

## 2012

SØVN LANDSINS

FAROE ISLANDS NATIONAL HERITAGE
ARCHIVES, LIBRARY AND MUSEUMS

Ritstjórn: Andras Mortensen
Layout: Stephanssons hús
Søvn Landsins, Tórshavn 2012
ISBN 978-99918-862-0-6

# ÁRSFRÁGREIÐING 2012

SØVN LANDSINS
Faroe Islands National Heritage.
Archives, Library and Museums
Kúrdalsvegur 15 · P.O. Box 1155 ·
FO-110 Tórshavn Tel. +298 340 500
savn@savn.fo · www.savn.fo

# Innihald


## 6 Ársfrágreiðing

8 Landsbókasavnið
10 Landsskjalasavnið
12 Fornminnissavnið
14 Náttúrugripasavnið

## 17 Úr virkseminum í 2012

17 Bókaútgávan 2012
18 Bókasøvnini
19 Talgildingin og talgilda bókasavnið
21 Talgild tíðarrit og bløð
21 Savnsfagnaður
22 Álit um bátasmíð
23 Ætlan um upplivingardepil við Áir
23 Grannar í útnorðri
24 Anlegg frá kalda krígnum
24 Innflutt og innslødd sløg
25 Dorete Bloch heiðrað fyri framúr góða almenna miðlan
26 Teljingar av drunnhvíta
26 Grindahagtøl
26 Grindamerking
26 Grindamerking í Hvalba
27 Ein gomul kráka
27 Árinið av veðurlagsbroytingum á plantuvøkstur
28 Kirkjubømúrurin í 2012
29 Hvalastøðin við Áir
29 Depilshúsini
29 Fornminnaskráseting
30 Skjalasavnsdagur 2012
30 Jarðarbókin 1584 avskrivað og løgd út á netið
30 Skjøl á mentanarnátt og vísindavøku

## 32 Verkætlanir og millumtjóða samstarv

32 Norðurlendskt ríkisantikvarsamstarv
32 DEFF
32 Ex Libris
32 ISBN
32 NordINFOLIT

32 Tíðarrit.fo
32 Nordisk-baltisk biblioteksseminarium/konferens
32 Nordiske Bogbind
32 Norðurlendskir skjalasavnsdagar 2012
32 ICA
33 Nordisk Arkivnyt
33 Skjalasøvn í útnorðri
33 Netverk fyri stjórar á norðurlendskum tjóðsøvnum
33 Nordic Baltic Mobility Network
33 Verkætlanin "Fortsatte undersøgelser af grindehvalernes vandringer i Nordatlanten"
33 NSMMN (North Sea Maritime Museum Network, ANSC) ITEX og GLORIA
33 CAFF (Conservation og Arctic Flora and Fauna)
34 NOBANIS (European Network on Invasive Alien Species)
34 NABO (North Atlantic Biocultural Organisation)
34 PAN (Polar Archaeology Network)

## 35 Greinar, frágreiðingar og luttøka

35 Greinar
36 Frágreiðingar og álit
36 Luttøkur
38 Minningarorð um Haldane Joensen

## 39 Hagtøl

39 Vitjanir á framsýningum
39 Starvsfólk, ársverk í 2012
40 Søvn Landsins, journalmál 2012
40 Landsskjalasavnið, skrásetingar og avgreiðslur
41 Bókasøvn 2012
41 Bókasavnsgjald og fólka- og skúlabókasøvn
42 Bygdasøvn
42 Onnur stuðulsveiting
42 Heimasíðuhagtøl

# Ársfrágreiðing



Andras Mortensen, stjóri

2012 var annað árið við Søvnum Landsins og harvið annað árið at røkka málinum við samanleggingini, at samskipa virksemini hjá landssøvnunum fyri at menna tey fakliga og fullnýta verandi játtan til savnsvirksemini eftir galdandi lógum.

At røkka tílíkum málum er eingin einføld uppgáva. Nýggi stovnurin skal uppbyggjast frá grundini, samstundis sum allar uppgávur hjá gomlu stovnunum skulu røkjast. Fakliga menningin, sum stungin er út í kortið, snýr seg bæði um tey einstøku fakøkini, sum stovnurin hýsir, og um at fáa meirúrtøku burtur úr samstarvi tvørtur um fakmørk og tvørtur um gomul stovnsmørk. Eisini snýr hon seg um at fáa eina effektivari fyrisiting, bæði av fakeindunum og uppgávum annars. Søvn Landsins hava ikki einans savnsfyrisitingarligar uppgávur, men eisini uppgávur, sum í grannalondunum liggja hjá stýrum undir aðalráðunum. Stovnurin umsitur meginpartin av løgtingsjáttanunum til mentanararv og skipanum í tí sambandi. Hann er tí í grundini eisini eitt stýri fyri mentanar- og náttúruarv.

Hesar stýrisuppgávur lógu áður hjá gomlu stovnunum, men eru nú miðsavnaðar hjá samskipaðu fyrisitingini. Tær snúgva seg í høvuðsheitum um at umsita myndugleika eftir savnslógunum og fornminnafriðingarlógini og øðrum lógum, stuðulsskipanir í sambandi við hesar eins og aðrar játtanir til mentanararvsøkið. Næsta stig-ið í samanleggingartilgongdini er at fáa lóggávurnar, sum stovnurin virkar eftir, dagførdar, soleiðis at tær samsvara við nýskipanina, sum sett er í verk.

Nógv atlit eru tí neyðug at taka í samanleggingartilgongdini, og væl má ansast eftir ikki at niðurlaga tað, sum gjøgnum nógv ár er bygt upp, við tógvið slit undir trongum kørmum, nú eins og áður. Tí er eisini neyðugt, at samanleggingartilgongdin fer lagaliga fram og við støði í viðkvæmum samstarvi tvørtur um mørk.

Sum liður í samanleggingartilgongdini vórðu við ársbyrjan virksemini hjá Náttúrugripasavninum og tí landskassafíggjaða partinum av Havlívfrøðiligu Royndarstøðini í Kaldbak løgd saman. Meginendamálið var at styrkja tað museala virksemið, sum Náttúrugripasavnið hevur sum uppgávu sambært lóg. Ein týðandi partur av virkseminum hjá Havlívfrøðiligu Royndarstøðini hevur tó ikki verið fíggjaður úr landskassanum, men gjøgnum sølu av granskingargrundaðum tænastum til privata vinnu, serliga alivinnuna og oljuvinnuna, og virkar eftir marknaðartreytum. Hesin parturin er tí óávirkaður av nevndu samansjóðing.

Ein týðandi liður í samanleggingartilgongdini var at skipa eina felags fyrisiting og tað, sum hartil hoyrir. Fyrisitingin hjá Søvnum Landsins húsast saman við Fornminnissavninum á gomlu royndarstøðini í Hoyvík. Skipað er ein felags húsavarðatænasta, nýggj samskiftisskipan til allan stovnin, felags teldukervi í landsneti, felags journalskipan, felags roknskaparreglugerð og tíðarskrásetingarskipan, og sjøtil varð settur á at skipa eina felags miðlan úteftir. Hetta síðsta er ein sera týðandi uppgáva, sum krevur menning, serliga í tí museala virkseminum, og snýr seg í høvuðsheitum um at fáa meir burtur úr framsýningunum gjøgnum samskipan og at menna samskiftið við skúlar og aðrar brúkarar av søvnunum eins og almenningin annars.

Samanleggingartilgongdin er grundað í áliti frá 2009, og ein annar liður í henni er at umskipa vísindalig størv, soleiðis at somu krøv verða sett til tey sum í savnsumhvørvum í grannalondunum og tí føroyska universitetskervinum. Í 2012 varð sjøtil settur á henda spurning við metingum um, hvussu tað vísindaliga virksemið eigur at verða skipað í framtíðini. Tað granskingarliga virksemið hjá søvnunum er grundað í lógarfestu uppgávunum, sonevnt sektorgranskingarvirksemi, og endamálið við tí er at viðvirka til menning av tí umsitingarliga økinum og fremja granskingar-, útgreiningar- og ráðgevingaruppgávur, sum verða álagdar ella umbidnar, ofta móti gjaldi. Ein týðandi spurningur í samanleggingartilgongdini er tí at finna javnvágina millum umsiting og gransking, soleiðis at fakøkini, sum søvnini varða av, framvegis kunnu verða ment og ein góð tænasta veitt, bæði í miðlanini til skúlar og almenning og teimum umsitingarligu uppgávunum yvirhøvur.

Hølisviðurskiftini hjá Søvnum Landsins eru trupul. Á lesistovum og í framsýningum eru tey rímilig, hóast bæði brúkarar og starvsfólk kundu hugsað sær umstøðurnar betri. Størsti tørvurin er kortini í starvshølum og goymslum, og í 2012 vórðu stig tikin til at betra um hesi viðurskifti. Í savnsvirksemi er tað sera umráðandi, at goymsluumstøðurnar eru nøktandi í mun til áløgdu uppgávurnar. Tað, ið verður savnað, skal varðveitast til komandi ættarlið, og umráðandi er at tryggja, at virðini ikki koma í vanda fyri at forfarast orsaka av goymsluumstøðunum. Neyðugt er, at goymslurnar eru tryggar, t.e. vardar og skipaðar í mun til eldsvanda og stuldur, og eisini við atliti at inniluft, soleiðis at savnindi ikki fáa skaða av hesum, og arbeiðsumstøðum, soleiðis at vandi ikki verður fyri óskili vegna plásstrot ella óhóskandi goymsluskipan. Goymslurnar hjá Søvnum Landsins eru á 8 ymiskum adressum, tríggjar teirra í leigaðum hølum, og rúm er ikki fyri meira. Serliga trupul er støðan hjá Landsskjalasavninum, sum skal savna, skipa, varðveita, lýsa og røkja tey skjøl, sum almennir stovnar skulu avhenda til savnið. Vegna plásstrot fær skjalasavnið ikki tikið ímóti, og avleiðingin er millum annað, at gamalt skjalatilfar tekur óneyðuga nógv pláss úti hjá stovnunum eins og tað ikki er atkomuligt í upplýsing og gransking eins og tað skal eftir skjalasavnslógini. Søvn Landsins meta, at tørvur er á at útvega eina umleið 4.000 fermetrar stóra goymslu fyri at nøkta goymslutørvin.

Ein stór avbjóðing hjá Søvnum Landsins er at kunna taka ímóti talgildum savnindum og varðveita tey til eftirtíðina. Serliga er hetta galdandi á skjalasavnsøkinum og bókasavnsøkinum, men eisini á tí museala økinum. Flestu almennu stovnar hava nú skift til sonevndar "pappírsleysar" journalskipanir, har skjøl einans finnast í talgildum formi, og hesum journalskipanum er tað skylda Landsskjalasavnsins at hava eftirlit við og kunna taka ímóti, tí savnindini skulu avhendast sambært skjalasavnslógini. Eisini velja støðugt fleiri bókaútgevarar at geva bøkur út á internetinum uttan at prenta tær, fyri ikki at tala um alt tað, ið verður lagt út á tær mongu heimasíðurnar. Øllum hesum eigur Landsbókasavnið sambært lóggávu at kunna taka ímóti og varðveita. Neyðugt er, at tøkniligar og fíggjarligar umstøður verða veittar, soleiðis at hesar týdningarmiklu savnsuppgávur kunnu røkjast á tryggan hátt.

# Landsbókasavnið



Landsbókasavnið er tjóðbókasavn og høvuðsbókasavn í landinum. Sum høvuðsbókasavn skal Landsbókasavnið saman við hinum bókasøvnunum kring landið og stovnsbókasøvnunum fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi.

At vera tjóðbókasavn merkir, at Landsbókasavnið skal savna, skráseta og varðveita allar føroyskar bókmentir, og alt sum er skrivað av bókmentum um Føroyar og av føroyingum. Talan er ikki bara um bøkur og tíðarrit, men eisini um ljóðbøkur, tónleikaútgávur, filmar og talgildar útgávur, t.d. e-bøkur, umframt stóran part av tí, sum verður almannakunngjørt á netinum.

Ein týðandi liður í savningararbeiðinum er lógarásetta avhendingin av skyldueintøkum. Skylduavhendingin er partur av støðinum undir okkara felags tjóðminnum og skal eisini tryggja støðið undir tjóðbókaskránni, so at hon verður so fullfiggjað sum gjørligt.

Í bókasavnslógini er ásett, at av øllum verkum, útgivnum í Føroyum, skulu avhendast 4 ókeypis eintøk til Landsbókasavnið.

Mentamálaráðið lýsti 20. januar 2012 nýggja kunngerð um avhending av skyldueintøkum, sum fevnir um bæði vanligt prentað tilfar og útgávur á netinum. Í § 3, stk. 4 í kunngerðini verður sagt, at "er talan um útgávur, ið eru tøkar á netinum, skulu hesar fráboðast Føroya Landsbókasavni so hvørt. Landsbókasavnið ger av, hvussu avhendingin í slíkum førum fer fram." Landsbókasavnið fer í 2013 undir skipaða innsavning av tilfari, sum verður almannakunngjørt á netinum, og verður hetta gjørt sum liður í varðveitingini av talgildaentanararvinum.



Á Landsbókasavninum er bókasavnsvirksemið skipað í hesar deildir:

* Miðling, sum fevnir um útlán og avgreiðslu av lánarum, vísindabókasavnstænastu og innkeyp og klárgerð av bókasavnstifari.
* Føroyadeild, sum umframt savn av føroyskum bókmentum eisini fevnir um handrita deildina og skylduinnheintingina.
* Tjóðbókaskrá, sum fevnir um skráseting til føroyska bókalistan og er føroysk ISBN-umsiting.

Á ávikavist deildunum Føroyadeild og Tjóðbókaskrá vórðu tveir bókavørðir settir sum serfrøðingar og ábyrgdarar í 2012.
Í 2012 starvaðust í miðal 18 starvsfólk í 15,85 fulltíðarstørvum á Landsbókasavninum. Av hesum vóru 7,75 bókavørðir. Hini starvaðust við m.a. fyrisiting, avgreiðslu, keyp og sølu og bókabinding.

Hóast tvey starvsfólk vórðu sett í nýggj størv í 2012, er tó framvegis trupult hjá Landsbókasavninum við verandi manning at røkja allar lógarásettar skyldur.

Landsbókasavnið fekk umleið 3.000 fyrispurningar í 2012. Tveir triðingar av hesum vórðu avgreiddir beinleiðis um bókavarðaborðið og restin um telefon ella við teldubrævi.

Útlánið hjá Landsbókasavninum var í 2012 uml. 24.000 eintøk, íroknað lán úr Føroyadeild, fjarlán og niðurtøka av greinum og bókum úr E-feingi.

Ein alt størri partur av útlánunum er niðurtøka av netinum úr tíðarrits- og bókagrunnum í E-feingi. Í 2012 vórðu yvir 10.000 greinir og útivið 4.500 bøkur ella partar av bókum læntar á henda hátt.

Søvnini í Søvnum Landsins hava felags heimasíðu, savn.fo, sum fyribils vísir til egnu heimasíðurnar hjá søvnunum. Heimasíðan hjá Landsbókasavninum, flb.fo, verður væl vitjað. Í 2012 vitjaðu uml. 18.000 fólk heimasíðuna góðar 42.000 ferðir, og tey lótu í miðal upp 3,7 síður við hvørja vitjan ella 156.000 síður íalt. Landsbókasavnið hevur eisini eina síðu á Facebook, har kunnað verður um mangt og hvat, og tann síðan er væl vitjað.

Landsbókasavnið og hini bókasøvnini í bókasavnsskipanini Aleph eru eisini felags um leitisíðu á netinum (bokasavn.fo) til leiting eftir og bílegging av bókmentum hjá øllum hesum bókasøvnunum.

Á Landsbókasavninum vóru við ársenda 2012 39.300 titlar í Útláninum, 17.900 í Føroyadeild, 28.900 í Goymslu, 6.000 í Vísindadeild og 2.800 á Lesistovuni, 94.900 titlar íalt, ella 174.000 eintøk. Afturat hesum koma 680 handritapakkar.

Landsbókasavnið fær á hvørjum ári fleiri handrit og annað tilfar úr privatsøvnum hjá fólki til gávis.

Í fjør varð eitt nú handskrivað handrit frá 1925 við endurminningum hjá Onnu Lützen, sum tá búði í Danmark, latið til Føroyar, og Landsbókasavnið fekk á heysti 2012 handritið í varðveitslu. Í hesum sambandi varð í januar 2013 skipað fyri samkomu á Landsbókasavninum, har greitt varð frá handritinum, og høvi var at síggja tað.



E-feingi er ein elektronisk vísinda-bókasavnstænasta. Her er atgongd til vísindaligar greinir og e-bøkur frá fleiri av stóru útgevarunum.

Føroyska ISBN-útgávuøkið hevur frá byrjan havt landanummarið 99918. Nú gomlu ISBN eru um at vera uppi, hava vit fingið tillutað 99972 sum nýtt landanummar.

Upphæddin til bókasavnsgjaldið, sum á hvørjum ári verður býtt út til føroyskar rithøvundar og týðarar og myndlistafólk, hvørs bøkur ella týðingar eru til taks á bókasøvnunum, var í 2012 1.090.642 kr. Upphæddin varð býtt millum 246 høvundar, týðarar og listafólk, sum hava myndprýtt útgávur.

Landið letur eisini stuðul til ljóðbókaframleiðslu, sum Søvn Landsins umsitur. Stuðulin, sum í 2012 var 497.000 kr., verður latin Ljóðbókanevndini til útgávuvirksemi.

Í bókasavnslógini stendur, at Landsbókasavnið í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya og aðrar vísindaligar stovnar kann veita vísindabókasavnstænastu. Síðan 1995 hevur avtala um bókasavnssamstarv verið millum Fróðskaparsetrið og Landsbókasavnið. Sambært hesi avtalu skal Fróðskaparsetrið seta í starv og løna bókavørði, sum starvsliga er knýttur at Landsbókasavninum, sum so átekur sær umsitingina og fakligu røktina av bókasøvnum og bókatilfeingi Setursins.

Í áliti um savnsbygnað frá 2009, tá ætlan varð gjørd um, at fleiri søvn skuldu leggjast saman í stovnin Søvn Landsins, er eisini orðing um universitetsbókasavn: "Mælt verður til, at tað verður Landsbókasavnið, ið veitir bókasavnstænastu á Fróðskaparsetrinum í tøttum samstarvi við megindeildarráðini, tvs. at Landsbókasavnið fær støðu sum universitetsbókasavn."

Í hesum sambandi hevur ein arbeiðsbólkur á heysti 2012 gjørt eitt fyrsta útkast til eina greining av, hvat skal til, um Landsbókasavnið umframt at vera tjóðbókasavn eisini kann virka sum universitetsbókasavn: Landsbókasavn og universitetsbókasavn. Søvn Landsins og Fróðskaparsetur Føroya, januar 2013.

Landsbókasavnið rekur saman við øðrum stovnum E-feingi (http://www.flb.fo/efeingi/), sum er ein elektronisk vísindabókasavnstænasta. Her er atgongd til nakrar av teimum stóru vísindaligu leitigrunnunum og til vísindaligar greinir og e-bøkur frá fleiri av stóru útgevarunum.

Í E-feingi eru uml. 50 leitigrunnar, yvir 5.000 vísindalig tíðarrit og 70.000 útlendskar yrkisligar e-bøkur. E-feingi fer at verða ein týðandi táttur í einum komandi føroyskum universitetsbókasavni.

Í 2012 vórðu hildin fleiri skeið, har greitt varð frá leiting og nýtslu av tænastunum í E-feingi.

Nevnast kann, at Landsbókasavnið eisini eftir umbøn hevur bókasavnskunning fyri lesandi og øðrum, sum hava brúk fyri bókasavnstænastum.

# Landsskjalasavnið





Síðani 2009 hevur Landsskjalasavnið talgilt savnindi og lagt hetta talgilda tilfarið (gomlu skjølini) á heimasíðuna www.history.fo.

Landsskjalasavnið hevur havt skipað eftirlit við teimum umleið 400 almennum myndugleikum síðani 2006. Í 2012 varð vitjað hjá 19 almennum myndugleikum (stovnum og ráðum). Orsakað av stovnsstødd varð í einstøkum føri vitjað á sama stovni fleiri ferðir. Hvørki kommunur ella kommunalir/interkommunalir myndugleikar vórðu vitjaðir í 2012.

Í 2012 tók Landsskjalasavnið móti 26 avhendingum, harav 6 almennum, 9 hálvalmennum (sjúkrakassum) og 11 frá privatum avhendarum.

Mannagongdir í sambandi við almennar avhendingar eru vorðnar meira skipaðar við árunum, hóast Landsskjalasavnið enn hevur ávíst skrásetingararbeiði, tá tær verða avhendaðar. Størri arbeiði liggur í privatu avhendingunum, men arbeitt verður við at fáa meira skipaða tilgongd á hesum øki eisini.

Fimm mál vóru um góðkenning í 2012. Tey snúðu seg m.a. um loyvi at nýta pappírsleysa journal, um journalir (myndugleikasamanlegging og flutt málsøki) og um vraking/goymslu av elektroniskum roknskapum. Arbeitt verður við at menna júst hetta økið, t.e. miðla betur og gera serstøk oyðubløð. Landsskjalasavnið góðkennir nýtslu av pappírsleysum journalum og EMSH-skipanum við tí fortreyt, at alt skal kunna prentast út, tá tað verður avhent. Talgild varðveiting ella varðveiting av savnindum, ið upprunaliga eru talgild, verður ikki gjørlig í Føroyum fyrr enn miðfyrisitingin setur meira fígging av til júst hetta endamál.

Mett verður at umleið 50 almennar smærri og størri ráðgevingar hava verið í 2012. Talið er grundað á, at teir fyrstu 4 mánaðirnar vórðu skrásettar 17 ráðgevingar. Tær flestu verða avgreiddar um telefonina ella við teldupostsamskifti, meðan aðrar krevja vitjan hjá tí myndugleika, ið hevur sett fyri-spurningin.

Við jøvnum millumbili, umleið eina ferð um árið, undirvísa starvfólk av Landsskjalasavninum á skeiði í journal- og goymsluviðurskiftum fyri starvsfólki í almennu umsitingini. Skeiðsdepilin skipar fyri og fíggjar hesi skeið.

Landsskjalasavnið hevur síðani 2008 skrásett bæði 'nýggjar avhendingar' og 'gomlu søvnini' í elektroniska skrásetingarskipan, nevnd ASTA. Hetta er fyrstu ferð Landsskjalasavnið hevur eina miðsavnaða skráseting. Tey gomlu søvnini verða løgd inn í skipanina, so hvørt tey verða umpakkað og umskrásett, meðan tær nýggju avhendingarnar

skulu leggjast í nýggju skipanina, beinanvegin tær koma á Landsskjalasavnið. Í 2012 eru gjørdar 18 móttøkur, og 91 søvn eru stovnað í skipanini.

Í 2012 viðgjørdi Landsskjalasavnið 13 umsóknir um atgongd til tilfar, ið ikki er beinleiðis atgongt. Tvær umsóknir um atgongd vóru ikki gingnar á møti. Ein teirra fekk negativa umrøðu í nøkrum blaðgreinum í Dimmalætting. Fleiri skeivar upplýsingar vóru í hesum blaðgreinum, tí hvørki journalisturin ella blaðið nakrantíð vendu sær til Landsskjalasavnið í sambandi við hesa skriving.

Síðani 2009 hevur Landsskjalasavnið talgilt savnindi og lagt hetta talgilda tilfarið (gomlu skjølini) á heimasíðuna www.history.fo. Hetta hevur fleirfaldað talið av brúkarum, ið nýta mest vanligu savnindini, t.e. kirkjubøkur, fólkateljingar, skiftiprotokollir o.tíl. Í 2012 lá mánaðarliga talið á serstøkum brúkarum á heimasíðuni millum 475 og 1760. Talið á vitjandi tilsamans í 2012 var meira enn 28.000, meðan talið á 'hits' á heimasíðuna var yvir 3.300.000. Hinvegin er talið á brúkarum á lesistovu minkað nógv seinastu árini og í 2012 var samlaða talið 897. Samstundis hevur Landsskjalasavnið havt gott 2.050 fyrispurningar av ymiskum slagi. Flestir teirra, 1.724, eru útlán á lesistovuni, 129 hava verið heimlán til myndugleikar, meðan 197 hava verið fyrispurningar um ymist í søvnunum, flestallir um vegleiðing í arkivrannsóknum. Av inntøkuvirksemi hevur tað verið siglingartíð, váttaðar tinglesingar og ein ella tvær transskiberingsumbønir.



Umleið triðja hvørt ár hevur Landsskjalsavnið skeið í arkivkunnleika fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum.

Umleið triðja hvørt ár hevur Landsskjalsavnið skeið í arkivkunnleika fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum. Í 2012 var skeið hildið fyri 6 (7) lesandi. Skeiðið varð fíggjað av Fróðskaparsetrinum.

## Ættarbandsskráin

Ættarbandsskráin er ein verkætlan, sum Landsskjalasavnið og Ílegusavnið undir Heilsumálaráðnum samstarva um og Ílegusavnið fíggjar. Í 2007 vóru 13 (parttíðarsett) starvsfólk knýtt at verk-ætlanini, sum síðani er minkað. Í 2012 var eitt starvsfólk (½ tíð) fast knýtt at verkætlanini, meðan tvey onnur starvsfólk vóru sett tíðaravmarkað til serligar uppgávur (inntøpping o.s.fr.). Skrásett verður í tvey sløg av dátugrunnum: 1) grundskráirnar (kirkjubøkur og fólkateljingar) og 2) ættarbandsskránna.

Í 2012 vóru 1.479 føddir persónar og 303 deyðir persónar tøppaðir inn í grundskránna fyri kirkjubøkur. Mett verður, at grundskráirnar nú innihalda allar dópar tey seinastu umleið 150 árini. Umleið 600 persónar fingu inntøppað deyðsdag í ættarbandsskránna. Tøl eru ikki fyri, hvussu nógv knýti ella sambond eru gjørd millum persónar í ættarbandsskránni. Hetta arbeiðið verður gjørt, so hvørt sum tað er neyðugt.

Umleið 6 verkætlanir, tríggjar størri og tríggjar smærri hava verið gjørdar í 2012. Talan er um verkætlanir, har ættartræ hjá fólki við ávísari diagnosu verður gjørt. Tað er ógvuliga ymist, hvussu stórar ella rúgvismiklar hesar eru. Nakrar snúgva seg um at greina ættina hjá 100 persónum, meðan aðrar bert snúgva seg um at greina eitt ættartræ. Mest umfatandi verkætlanin higartil snýr seg um at knýta 400 persónar til systkin og systkinabørn við eftirkomarum heftum uppí. Henda verkætlanin hevur verið í gongd alt árið.

# Fornminnissavnið









Fornminnissavnið er mentanarsøguligt tjóðsavn, ið savnar inn, skrásetir og sýnir fram fornlutir og lutir úr nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan til ymsar tíðir. Fornminnissavnið hevur eisini til uppgávu at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum og fyrireikar og stílar fyri, tá ið forn búpláss og søgulig lendi verða grivin út. Savnið hevur eftirlit við friðaðum bygningum og er fakligur myndugleiki í sambandi við fornlutir í havinum. Savnið hevur hesi trý fakøki:

* Bygningaantikvarisk mál um varðveitingarverd friðað hús, bygningar og umhvørvi
* Fornfrøðilig mál og søguskeiðið frá landnámi til trúbótartíð uml. 1550
* Fólkalívsfrøðilig mál og søguskeiðið frá trúbótartíð til í dag

Fornminnissavnið umsitur friðað hús kring landið og hevur ábyrgdina av at halda viðlíka og umvæla hesi hús. Millum ognirnar, sum arbeitt hevur verið við, kunnu nevnast gomlu bóndahúsini í Hoyvík, bóndahúsini í Depli, Dúvugarðar í Saksun, í Koytu á Sandi og húsini uttan Ánna í Sandvík. Í 2012 hevur serliga verið arbeitt við at fáa tað umfatandi umvælingararbeiðið í Depli liðugt.

Tey landsgóðkendu bygdasøvn, sum eiga friðað hús, og Føroya Forngripafelag, sum eigur hús kring landið, hava fingið vegleiðing um, hvussu ognirnar skulu umvælast og haldast viðlíka, og um onnur teknisk viðurskifti. Savnið hevur havt samstarv við bæði kommunalar og landsmyndugleikar.

Av øðrum antikvariskum uppgávum hevur verið arbeitt við nýggjum byggisamtyktum í Eysturkommunu eins og ætlanum um broyting av byggisamtyktum fyri Mykines, Bø og Gásadal.

Fornfrøðiligar kanningar vórðu gjørdar í sambandi við víðkanina av tyrlupallinum í Fugloy, har staðfestar vórðu øskufláir og garðslaðing, umframt ein minni kanning í sambandi við varðveitingararbeiðini av Ølvustovu í Funningi. Samband hevur verið við Vága kommunu um varðveiting av krígsminnum á Vatnsoyrum, og ymisk faklig tilmæli og metingar um ymisk landsløg og umhvørvi á Sandi, í Koltri, Kirkjubø og í Norðuroyggjum hava verið gjørd.

Fornminnaskrásetingar vórðu gjørdar í Kirkjubø, Oyndarfirði og á Velbastað, har leivdir eftir fornum kirkjum og kirkjugørðum vórðu skrásettar –

á Líkhúsi, í Prestbøtoft og Niðri á Bakka. Ástaðarkanning var við Kirkjuvatn í Fámjin, har fráboðanir um jarðfest fornminni kundu staðfestast. Harafturat hevur verið arbeitt við menning av tøkni í sambandi við somu fornminnaskrásetingar. Í sambandi við varðveitingina og umvælingina av býlinginum Heimi í Húsi í Koltri vórðu fornfrøðiligar kanningar gjørdar. Tær skuldu vera støði undir endurbyggingini av sethúsunum Uppi í Húsi í 2011. Við atliti at tíðarfestingini vórðu gjørdar kontrolltíðarfestingar av hesum bústaðaleivdum, ið kunnu tíðarfestast til 800-900-árini.

Fyrispurningar hava verið um tilfar og gripir, sum funnir eru í ávísum bygdum, eins og starvsfólk hava veitt fakliga vegleiðing til lesandi bæði á útlendskum universitetum og á miðnámsskúlum kring landið. Áhugin hjá útlendskum granskarum at nýta gripir, ið eru funnir í fornfrøðiligum rannsóknum í Føroyum, tykist vaksandi. Fyrispurningar komu úr eitt nú Noregi, Danmark og USA. Eingin ítøkilig fornfrøðilig rannsókn var í landinum í 2012.

Veitt hevur verið varðveitingarteknisk og konserveringsráðgeving til bygdasøvn og kirkjur. Ymiskt samskifti hevur verið í sambandi við konserveringina av altartalvuni í Christianskirkjuni í Klaksvík, og gjørd hevur verið ein interiørskráseting og lit-royndir í Amtmansborgini. Ráðgeving hevur verið veitt Bygdasavninum í Nes kommunu, Sands Fornminnafelag og Kollafjarðar bygdarsavni, og arbeitt hevur verið við húsunum uttan Ánna í Sandvík, og ráðgivið, tá ið friðaðu húsini á Krákusteini í Tórshavn skiftu eigara.

Myndaskrásetingin helt fram, og fleiri avhendingar hava verið frá familjum, ið hava latið heil myndasøvn og annað skrivligt tilfar, eitt nú arbeiðs- og bíleggingarbøkur hjá serligum yrki. Viðvíkjandi skráseting av gripum tók serliga Seglvirkið í Havn tíð. Enn vantar skráseting av rúgvismiklum skrivligum tilfari sum arbeiðs- og bíleggingarbókum, tekningum og uppmátingum.

Seglvirkið er ein liður í innsavningini um maritima søgu, og samband er eisini við sjófólk, ið hava myndir frá skipum í 1970-80-árunum.

Gripir frá hvalastøðini við Áir eru eisini komnir á savnið. Hetta er eisini liður í innsavningini og skrásetingini um maritima søgu. Gripir av hvalastøðini við Áir, sum hava ligið á goymslu, eru somuleiðis skrásettir. Enn vantar skrásetingin av skrivligum tilfari sum sjókortum o.ø. smærri savnindum.
Fornminnissavnið tók lut í arbeiðsbólkinum fyri hvalastøðina við Áir og í arbeiðinum at orða eina yvirlitsætlan fyri økið við Áir.

Várið 2012 tóku starvsfólk á savninum lut í nevndini at orða 'Álit um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi'. Arbeiðið var liðugt og handað landsstýrismanninum í mentamálum í mars 2012.

Ein bundin verkætlan um minnisrit Føroya Fiskimannafelags fór fram á savninum. Verkætlanin verður liðug í 2013, og arbeitt varð somuleiðis við at leggja til rættis útgávu av verkætlanini 'Dagbók 1999'. Verður tikin upp aftur í 2013.

Skúlatænastan hevði um hendur vitjanir í framsýningunum í Brekkutúni, Hoyvíksgarði og útisavninum og bólkum í Dúvugørðum í Saksun og á Hvalastøðini við Áir. Talan var um skúlaflokkar og næmingabólkar, dansifeløg og áhugabólkar, barnagarðar og pensionistar. Tilfar varð sent út til skúlar, starvsvenjing samskipað og sambandið við miðlar og ferðavinnu varð røkt. Eitt serligt átak fór fram um kornvelting í útisavninum saman við skúlaflokkum, og luttikið varð í einum fylgibólki hjá Námi at gera nýggjar søgubøkur til fólkaskúlan.

Saman við Náttúrugripasavninum, sum eisini er í Søvnum Landsins, varð skipað fyri barna- og ungdómsframsýningini 'Savnsfagnaður' í oktober í Hoyvík, Kúrdali og í Brekkutúni, og arbeitt varð eisini við at samskipa eina felags framsýning í Brekkutúni hjá Jarðfeingi, Náttúrugripa- og Fornminnissavninum, sum letur upp í 2013.

Nógv virksemi var um musealt samstarv í framtíðini millum Náttúrugripasavnið og Fornminnissavnið um felags virksemi hjá hesum báðum søvnum og eitt nú dagføring av útisavninum í Hoyvík og Kúrdali við náttúrufrøðiligum og mentarsøguligum innihaldi.

# Náttúrugripasavnið



Í 2012 var Havlívfrøðiliga Royndarstøðin í Kaldbak, sum partvíst er fíggjað úr landskassanum og partvíst inntøkufíggjað, løgd saman við Náttúrugripasavninum. Virksemini hava áður verið saman, men vórðu sundurskild í 2007. Tann landskassafíggjaði parturin av Havlívfrøðiligu Royndarstøðini er nú vorðin til sjódýradeild á Náttúrugripasavninum, meðan gamla djóradeildin er broytt til at vera landdjóradeildin. Harumframt hevur Náttúrugripasavnið eina plantudeild.



Í sambandi við at umskipanina av Náttúrugripasavninum er sjódýradeildin farin undir miðvíst arbeiði at skráseta og gera nýggjar mannagongdir fyri eitt føroyskt fiskasavn.

Samstarvað varð um framsýningina ”Innflutt og innslødd sløg”, sum læt upp á sumri 2012. Eisini var farið undir at skipa felags dátugrunn til skráseting av goymslulutum. Hetta arbeiðið fer at halda fram í 2013.

Landdjóradeildin fekk handað 23 frystar og ein útstappaðan fugl frá einum gevara. 2726 fuglar vórðu ringmerktir og 150 ringmerktir fuglar vórðu skrásettir.

Náttúrugripasavnið hýsir verkætlan hjá Fiskimálaráðnum og ráðgevur Fiskimálaráðnum í spurningum um hval og kóp. Náttúrugripasavnð luttekur eisini sum ráðgevi á fundum í norðuratlantssamstarvsráðnum um havsúgdjór - NAMMCO.







Gongdin seinastu árini hevur verið, at støðugt fleiri uppgávur verða loystar, og at tørvurin er vaksandi samsvarandi støðugt øktum myndugleikakrøvum. Fýra lívfrøðingar starvaðust á Havlívfrøðiligu royndarstøðini í 2012 og tey skrivaðu 32 frágreiðingar fyri alivinnuna, 4 frágreiðingar fyri ymisk fiskavirkir og eina frágreiðing í sambandi við vatnorkuútbygging. Harumframt eru gjørdar fleiri kanningar, har eingin frágreiðing er skrivað. Eisini vóru 112 grabbasýni viðgjørd í sambandi við kanningar av havbotninum undan oljuboring.

Alt tilfarið er partur av savninum hjá sjódýradeildini, sum eisini letur tilfarið skráseta, so at tað er teldutøkt.

25 tíðindastubbar vóru á heimasíðuni www.ngs.fo.
Teir vóru um grindir, merking av grindahvali og kunning um annan hval sæddan kring Føroyar, ringmerktar fuglar, fuglar frá Helgolandsfelluni í Nólsoy og onnur tíðindi um fugl, kunning um morsnigil og plantur og hitabroytingar.

## Havlívfrøðilig Royndarstøð

Havlívfrøðiliga Royndarstøðin veitir tænastur í teimum førleikaøkjum, sum deildin hevur, og ger museala innsavning í sambandi við hetta.



# Úr virkseminum 2012

## Bóaútgávan 2012

Í 2012 vórðu 262 nýggjar føroyskar bøkur skrásettar í føroyska bókalistanum. Tá eru endurútgávur eisini taldar við. Hetta árið komu eisini út umleið 20 árbøkur, 29 tíðarrit og bløð og 17 ljóðbøkur. Eisini komu út 102 e-bøkur, og av hesum áttu Sprotin og Bókadeild Føroya Lærarafelags tær flestu. Hetta er munandi øking, tí í 2011 vórðu einans 10 føroyskar e-bøkur skrásettar í føroyska bókalistanum. Í 2012 eru eisini skrásettar 55 føroyskar tónleikaútgávur.

### Bókaútgávan 2012 og 2011

| | Upprunaverk | | Týðingar | | Útgávur íalt | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2012 | 2011 | 2012 | 2011 | 2012 | 2011 |
| Fagurbókmentir | 26 | 28 | 25 | 19 | 51 | 47 |
| Yrkisbókmentir | 57 | 63 | 20 | 7 | 77 | 70 |
| Lærubøkur | 22 | 28 | 22 | 4 | 44 | 32 |
| Barnabøkur | 12 | 14 | 78 | 82 | 90 | 96 |
| Tilsamans | 117 | 133 | 145 | 112 | 262 | 245 |
| | | | | | | |
| Týðingar. Úr | | | | | | |
| donskum | | | 51 | 30 | | |
| enskum | | | 31 | 31 | | |
| norskum | | | 13 | 11 | | |
| svenskum | | | 17 | 13 | | |
| øðrum málum | | | 33 | 27 | | |
| Til samans | | | 145 | 112 | | |

# Úr bókarúgvuni



# Úr virkseminum 2012

## Bókasøvn

Fólkabókasøvnini eru kommunal, men landið rindar fólkabókasøvnunum studning til rakstur og eftir tilmæli frá Søvnum Landsins studning til bygging, um- ella uppíbygging ella keyp av bókasavnshølum.

Sambært § 14 í bókasavnslógini rindar landið fólkabókasøvnum studning til rakstur eftir góðkendari fíggjarætlan. Frá og við fíggjarárinum 2006 er árliga studningsprosentið tó í mesta lagi 40% av góðkendu fíggjarætlanini hjá fólkabókasøvnunum.

Í Rundskrivi um studning til fólka- og skúlabókasøvn hjá Mentamálaráðnum, dagf. 13. februar 2006, er ásett, at rakstrarútreiðslurnar, sum kunnu fáa veittan studning, eru løn til starvsfólk, keyp av bókasavnstilfari, útreiðslur til hita, ljós og reingerð og til telduútgerð, innbúgv og viðlíkahald.
Landið rindar eisini skúlabókasøvnum 60% í studningi av útreiðslunum til undirvísingartilfar og -amboð.

Í februar/mars mánaði fáa fólka- og skúlabókasøvnini 80% av játtaða studninginum í sama fíggjarári, og í februar árið eftir avrokna Søvn Landsins so tað, sum er eftir av játtaða studninginum fyri undanfarna rakstrarár út frá roknskapunum, sum skulu vera innsendir í seinasta lagi 31. januar.

Í 2012 var almenni studningurin slakar 3 mió. kr., ella 23% av 13,3 mió. kr, ið var samlaða nýtslan til virksemið hjá fólkabókasøvnunum hetta árið. Hetta svarar til, at tað til fólkabókasavnstænastur vórðu brúktar 275 kr. fyri hvønn íbúgva í landinum.

Um vit hugsaðu okkum, at vit í staðin brúktu 500 kr. fyri hvønn íbúgva, sum ikki er óvanligt í okkara grannalondum, so skuldi samlaða nýtslan til fólkabókasøvn verið 24 mió. kr., ella góðar 10 mió kr. meira enn í 2012. Um landið læt 40% av hesi upphædd sum studning, skuldi almenni studningurin verið uml. 9,6 mió. kr., ella 6,6 mió. kr. meira enn í 2012, og kommunurnar skuldu játtað 14,5 mió.kr. ella 4,2 mió. kr. meira, enn tær játtaðu í 2012.
Fólkabókasøvn eru ikki í øllum kommunum í landinum, og tað er ymist, hvat tær ymsu kommunurnar játta til fólkabókasøvn. Upphæddin fyri hvønn íbúgva íroknað almenna studningin var t.d. 518 kr. í Fuglafjarðar kommunu, 378 kr. í Tórshavnar kommunu, 238 kr. í Vágs kommunu, 133 kr. í Sørvágs kommunu og 85 kr. í Vága kommunu.

Umframt Landsbókasavnið eru 21 fólkabókasøvn í landinum. Nøkur teirra virka eisini sum skúlabókasøvn. Harumframt eru 11 skúlabókasøvn og 14 stovnsbókasøvn. Av stovnsbókasøvnunum eru 6 skúlabókasøvn í miðnámsskúlum og á Fróðskaparsetrinum.

Bókasavnið við Løkin, sum áður hevði verið skúlabókasavn, læt í august 2012 upp sum fólka- og skúlabókasavn, og bókavørðurin Svend Højgaard varð settur sum leiðari. Í desember varð bókavørðurin Arnbjørn Dalsgarð settur sum nýggjur leiðari á Býarbókasavninum í Havn. Sambært bókasavnslógini hevur Landsbókasavnið eftirlit við fólkabókasøvnunum og veitir ráð og leiðbeining.
Bókatalið á øllum bókasøvnum í landinum liggur um 810.000 eintøk. Á Býarbókasavninum í Havn vóru við ársenda 2012 umleið 73.000 eintøk, ella 224.000 eintøk, tá ið bøkurnar á skúlabókasøvnunum í kommununi eru taldar við.

Á Klaksvíkar Bókasavni vóru umleið 43.000 eintøk og á Bókasavninum við Løkin sløk 35.000 eintøk. Á teimum trimum deildarbókasøvnunum á Fróðskaparsetrinum vóru umleið 46.000 eintøk. Annars er tað ymiskt, hvussu stóran bókastovn tey ymsu bókasøvnini hava. Tey flestu hava undir 10.000 eintøk, og onkur einstøk hava upp ímóti 20.000 eintøkum. Ikki øll bókasøvn hava alment útlán.

Útlánið hjá øllum bókasøvnunum í Føroyum var í 2012 íalt 248.000 eintøk. Av fólkabókasøvnunum hevði Býarbókasavnið í Havn flest útlán, 102.771 bøkur í 2012. Á skúlabókasøvnunum í Havn var útlánið 52.834 bøkur. Klaksvíkar Bókasavn lænti út gott og væl 26.000 bøkur og Bókasavnið við Løkin 10.500 bøkur.
Øll bókasøvnini uttan Býarbókasavnið í Havn brúka bókasavnsskipanina Aleph, sum Lands-



bókakasavnið umsitur. Skipanin fevnir um modul til útvegan av tilfari, skráseting, útlán og fjarlán. Í desember í 2012 keypti Landsbókasavnið eitt modul aftrat til skipanina til innheinting, skráseting og miðlan av talgildum tilfari.

## Talgildingin og talgilda bókasavnið

Talgildingin hevur verið ovast á breddanum hesi seinastu 25 árini, ikki minst tá talan hevur verið um virksemið hjá bókasøvnunum. Kortini er økið framvegis merkt av óvissu, sum altíð kemur við víðfevndari nýskipan.

Bókasøvnini hava ásannað bæði vansar og fyrimunir við talgildingini. Tann nógva kunningin og eisini útgávurnar, sum nú eru tøkar á netinum, hava gjørt, at fleiri tænastur hjá bókasøvnunum eru farandi. Hinvegin letur talgildingin upp fyri nýggjum møguleikum, bæði tá talan er um miðlan og varðveiting.

Tað avgerandi í hesum tíðum tykist vera, at bókasøvnini vinna fótafestið aftur og fara at leggja seg eftir at menna og læra betur at brúka sínar serførleikar. Og í okkara grannalondum verður nógv orka løgd í og peningur játtaður til at leggja og menna ætlanir fyri, hvussu bókasøvnini kunnu fáa sum mest burtur úr talgildingini.

Føroysk bókasøvn hava eisini staðið fyri ymsum átøkum á hesum nýggja øki. Landsbókasavnið samstarvar við aðrar stovnar um veiting av talgildum bókasavnstænastum á netinum. Dømi um hetta eru E-feingi, ætlað hægri útbúgvingum og til gransking, og EBI (Elektroniskar Bókasavnstænastur á Interneti), ið er ein fjølbroytt kunningartænasta serliga ætlað lærarum og næmingum í framhaldsdeildini í fólkaskúlanum og á miðnámsskúlunum. Nevnast kann eisini tidarrit.fo, sum er norðurlendskt samstarv um eitt talgilt bókasavn.

Landsbókasavnið hevur í 2013 ætlanir um at fara undir at heinta inn skyldueintøk av talgildum útgávum. Talan er fyrst og fremst um vanligar útgávur og rit, bløð og bloggar, sum verða skrásett, goymd og um gjørligt lænt út umvegis leitiskipanina hjá bókasøvnunum. Nógv av hesum tilfari er bara til í talgildum líki, og tað kann skjótt farast, verður tað ikki fingið til høldar.

Ein partur av hesum tilgilda tilfarinum eru e-bøkurnar. Í 2012 komu út yvir 100 føroyskar e-bøkur. Hetta ger spurningin, hvussu og eftir hvørjum treytum bókasøvnini kunnu læna út e-bøkur, átrokandi at loysa. Hetta er mál, sum tað eisini verður arbeitt við í okkara grannalondum, uttan at nøkur endalig loysn er funnin. Hetta er stór uppgáva, sum sjøtul tíverri ikki er settur á enn.

Bókasøvnini eru søvn, og tey hýsa hópin av tilfari, bæði eldri og nýggjari, t.d. bókum, bløðum, tíðarritum, øðrum miðlatilfari og handritum. Við nýggju tøknini ber til at talgilda nógv av hesum tilfari og miðla tað beinleiðis til brúkaran um netið, og tað er sum nevnt longu gjørt í ávísan mun. Ein ætlan at talgilda mikrofilmarnar av føroysku bløðunum, sum landsbókasavnið hevur, hevur leingi verið í umbúna, men her er kortini nógv eftir at gera. Eisini her eru óroyndir og áhugaverdir møguleikar at menna nýggjar føroyskar bókasavnstænastur. Talgilding av bókasavnstilfari er liður í varðveitingini av okkara mentanararvi.

# Úr virkseminum 2012

## Talgild tíðarrit og bløð

Tíðarrit.fo (http://www.tidarrit.fo/) er eitt talgilt bókasavn, har atgongd er til fleiri túsund talgildar blaðsíður av prentaða mentanararvinum, sum er varðveittur í bløðum og tíðarritum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Verkætlanin er eitt samstarv millum Grønlendska Landsbókasavnið, Landsbókasafn Íslands – Háskólabókasafn og Føroya Landsbókasavn.

Sum er eru 23 føroysk tíðarrit talgild í Tíðarrit.fo. Landsbókasavnið hevur ikki havt sjálvstøðuga játtan til hesa verkætlan í 2012.

### Hesi tíðarrit eru í Tíðarrit.fo:

- Arbeiðið 1934
- Búnaðarbløð 1903–1904
- Búreisingur 1902
- Dúgvan 1894–1925
- Dúgvan 1941–1942
- Fjarðbúgvin 1970–1975
- Fríu Føroyar 1942–1948
- Fróðskaparrit 1952–2010
- Fuglaframi 1898–1902
- Færingetidende 1852
- Færöernes Kundgörelsessamling/Føroya kunngerðasavn 1940–2002
- Færøsk Kirketidende 1890–1906
- Færøsk lovregister/Lovregister for Færøerne 1965–1988 og 1992–2011
- Føringatíðindi 1890–1906
- Kristeligt Ungdomsblad for Færøerne 1908–1918
- Norðlýsi 1915–1920
- Oyggjarnar 1905–1908
- Ólavsøku-teiti 1892–1943
- Tíðindablaðið 1974–1975
- Tímin 1943–1946
- Ungu Föroyar 1907–1915

# Úr virkseminum 2012



## Savnsfagnaður

Tað er vorðið ein siðvenja, at søvnini í høvuðsstaðnum skipa fyri savnsfagnaði í heystfrítíðini.
Søvnini í tiltakinum vóru Fornminnissavnið, Náttúrugripasavnið, Listasavnið og Sjósavnið, og endamálið við tí er at geva børnum eitt áhugavert savnstilboð í frítíðini. Í 2012 samskipaðu Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið sín part av tiltakinum, sum varð hildið á útisavninum í Hoyvík og í framsýningini í Brekkutúni 6. Í Brekkutúni var tiltakið ein samanrenning av tí, sum børnini kenna frá báðum framsýningunum, og evnið var aldur. Millum annað var høvi at uppliva gomul spøl, ið tey eldru kanska minnast frá sínum barnaárum, og við tíðarlinjum í framsýningini varð varpað ljós á aldur hjá ymiskum verum ella lutum. Á útisavninum í Hoyvík var høvi at uppliva og royna ymist, bæði úti og inni. Av serligum áhuga var tað, at fólk úr sjódýradeildini hjá Náttúrugripasavninum savnaðu ymist forvitnisligt tilfar úr fjøruni, sum serfrøðingar við sjóneykum sýndu børnunum. Tiltakið, sum var í døgunum 15. til 19. oktober, var sera væl vitjað, bæði í Brekkutúni og á útisavninum. Samanlagt vitjaðu 1.184 fólk hesar 5 dagarnar.

| Aldursbólkar | 0–6 | 7–9 | 10–13 | 14–17 | 18–66 | 67– | Til samans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Framsýning í Brekkutúni | 273 | 246 | 149 | 28 | 366 | 29 | 1091 |
| Útisavnið | 16 | 23 | 12 | 4 | 35 | 3 | 93 |
| Til samans | 289 | 269 | 161 | 32 | 401 | 32 | 1184 |

# Úr virkseminum 2012

## Álit um bátasmíð

Heystið 2011 varð ein nevnd sett at kanna umstøðurnar fyri, hvussu siðbundnum føroyskum bátasmíði kunnu verða skapt livilíkindi. Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var at orða eitt álit við uppskotum um, hvussu siðbundið føroyskt bátasmíð kann verða varðveitt. Hetta álit varð handað landsstýrismanninum í mentamálum, Bjørn Kalsø, tann 21. mars 2012. Í nevndini, sum gjørdi álitið, sótu Erland Viberg Joensen, formaður í nevndini, og Regin Debess, báðir fyri Søvn Landsins, Olga Biskopstø fyri Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning, Rúna Hjelm fyri Felagið Grindabátarnir í Vági, Terji Reinert Jacobsen, bátasmiður, Jan Herman Hansen fyri Róðrarsamband Føroya, Oystein Sørensen fyri Yrkisdepilin og Armgarð Weihe, skrivari í nevndini, fyri Mentamálaráðið. Samanumtikið varð í álitium mælt til, at



- Arbeitt verður fram ímóti, at UNESCO-sáttmálin til verju av immateriella mentanararvinum verður settur í gildi fyri Føroyar, og at føroysk lóggáva á viðkomandi økjum verður dagførd samsvarandi.
- Karmar verða skaptir fyri skipan av livandi søvnum innan føroyska savnslóggávu. Stuðulslóggávurnar til savnsvirksemið eiga í hesum viðfangi at verða dag førdar.
- Róðrarsamband Føroya, sum er kveikjari, tá tað kemur til at skapa áhuga fyri føroyska bátinum, tekur atlit at aðalreglunum í upprunasniðinum á føroyska bátinum í sínum regluverki.
- Játtan verður sett av á fíggjarlógini sum stuðul til virksemi hjá frítíðarfeløgum, ið eru um tann siðbundna føroyska bátin.
- Arbeitt verður fram ímóti, at útbúgving í siðbundnum bátasmíði verður skipað sum yrkisútbúgving.
- Skeiðstilboð í bátasmíði verða fyriskipað á tekniskum skúla í samstarvi við Søvn Landins.
- Samstarv verður skipað millum skúla og søvn um livandi savnsvirksemi.
- Samstarv verður skipað millum ferðavinnu og bátasmíð

## Ætlan um upplivingardepil við Áir



Landsstýrismaðurin í mentamálum setti í 2012 eina nevnd við umboðum fyri Søvn Landsins, Landsverk, Mentamálaráðið og Sunda kommunu at gera yvirlitsætlan fyri upplivingardepil við Áir. Í døgunum 23. til 27. oktober 2012 var nevndin á ferð í Danmark, Týsklandi og Noregi fyri at savna vitan og hugskot til arbeiðið at gera nevndu yvirlitsætlan. Vitjað varð á Fiskeri- og Søfartsmuseet í Esbjerg, Flensburger Schifffahrtsmuseum, Cathrinesminde Teglværksmuseum og Hvalfangstmuseet i Sandefjord. Ætlanin er, at nevndin skal vera liðug við arbeiði sítt móti sumri 2013. Í nevndini sita Andras Mortensen, formaður, Símun V. Arge, Erland V. Joensen og Jan Sørensen fyri Søvn Landsins, Ole Jensen fyri Landsverk, Armgarð Weihe fyri Mentamálaráðið og Asbjørn Djurhuus og Edvard Hermansen fyri Sunda kommunu.

## Grannar í útnorðri

Í juni 2012 gav forlagið Fróðskapur út bókina "Naboer i Nordatlanten. Færøerne, Island og Grønland". 17 søgufrøðingar úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi og Danmark hava skrivað, og ritstjórnað hava Jón Th. Thór, Daniel Thorleifsen, Andras Mortensen, Ole Marquardt. Frá Søvnum Landsins luttóku Andras Mortensen og Erland Viberg Joensen í verkætlanini.

Bókaútgávan var úrslit av, at Útnorðurráðið í 2000 mælti stjórnunum í útnorðurlondunum til at fáa í lag eitt samstarv um skriving  av felags søgu útnorðurs. Hetta førdi til, at ein bólkur av søgufrøðingum úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi og Danmark hittust í 2002 í Ilulissat í Grønlandi. Bólkurin setti sær fyri at skipa fyri seminarum og ráðstevnum, og úr tí virkseminum eru higartil útkomnar 3 bøkur við søgufrøðiligum greinum. Frá byrjan var málið, at netverkið skuldi fremja granskíng og innsavning av nýggjari vitan við miðlan av felags søguni til almenningin, og á leiðini varð avgerð tikin um eisini at skriva eina grundbók um felagssøguna hjá útnorðurlondunum.  Í bókini verða høvuðsliðirnir í felags søguni hjá teimum trimum útnorðurlondunum síðan miðøld fram til umleið 2000 lýstir. Tá ið íslendingar numu land í Grønlandi umleið 985 e. Kr. og teir seinni møttu landsins upprunaliga inuitfólki, var tað fyrstu ferð, at fólk úr eystri og vestri møttust, eftir at tey fyrstu fólkini í Afrika á tíðarinnar morgni spjaddust, summi norðureftir og onnur eystureftir.




Henda mentanarstevna í Grønlandi varð byrjanin til, at fólk í eystri og vestri aftur fingu samband við hvønn annan. Økt ferðsla millum tey skandinavisku londini, restina av Evropa og londini í útnorðri førdi soleiðis gjøgnum søgunnar óranssakandi vegir til ein søguligan lagnufelagsskap millum londini í útnorðri, sum støðugt verður útbygdur.



## Anlegg frá kalda krígnum

Søvn Landsins luttóku í 2011 og 2012 í verkætlan hjá Kulturstyrelsen í Danmark um ávísing og varðveiting av anleggum frá kalda krígnum, sum hava tjóðarligan týdning. Í Føroyum var úrslitið av verkætlanini, sum varð lagt fram í februar 2013, at víst varð á tvey støð, sum verða mett at hava serligt søguligt og mentanarligt virði, tá talan er um leiklut Føroya í kalda krígnum. Talan er um Loran-C støðina á Eiði og hernaðarstøðirnar í Mjørkadali og á Sornfelli. Sámal T.F. Johansen, leiðari á Landsskjalasavninum, hevur verið umboð fyri Søvn Landsins í arbeiðsbólkinum, sum hevur víst á 25 støð í Danmark, 6 støð í Grønlandi og 2 støð í Føroyum.

Mett verður, at júst hesi anlegg eru serliga væl egnað at siga frá leikluti Føroya í kalda krígnum og um hernaðarligu útbyggingina, ið hendi tá. Endamálið við at vísa á júst hesi støð er partvíst at gera almenningin varugan við, at hesi støð hava mentanarlig virði og partvíst at geva myndugleikum og eigarum eitt fakligt útgangsstøði at grunda teirra framtíðar planlegging á. Søgurnar um støðirnar vísa m.a., at hernaðarliga útbyggingin í Føroyum var tætt knýtt at geo-politiskum áhugamálum í vesturlendsku hernaðarsamgonguni NATO og kanska serliga USA. Hinvegin høvdu donsk-føroysku viðurskiftini sína ávirkan á tann mátan, hesi serligu geo-politisku áhugamálini vístu seg í føroysku hernaðarútbyggingini.

# Úr virkseminum 2012



## Innflutt og innslødd sløg

Náttúran er í støðugari broyting, bæði av natúrligum og av menniskjaskaptum ávum. Økta sambandið við útheimin hevur tó ført við sær, at nýggj sløg av djórum og plantum støðugt verða innflutt til oyggjarnar í nógv størri mun enn fyrr, bæði tilvitað og ótilvitað. Fyrst broyttu menniskju ta livandi náttúruna, tá ið tey fyri meira enn 1000 árum síðani settu búgv í landinum og høvdu seyð við sær. Seyðurin hevur broytt vistskipanina munandi, tí vøksturin alla staðni er niðurbitin. Hetta hevur ført við sær, at plantu- og djóralívið, t.d. fuglalívið, firvaldar og skordýr, er minkað.

Longu í 1768 kom rottan til landið. Hon hevur gjørt stóran skaða og hevur minkað um lunda, skráp og drunnhvítastovnin. Í nýggjari tíð eru fleiri nýggj plantu- og djórasløg sæð kring landið, og summi av teimum eru í menning og breiða seg skjótt. Tey mest ásýniligu eru vespan, flatmaðkurin og morsnigilin, apublóman og garðaskøran.

Plantur verða innfluttar við menniskjum til eitt nú urtagarðsbrúk, til fóður o.a. umframt eisini at verða innsløddar sum fræ. Saman við innflutningi av plantum kunnu djór eisini verða uppií. Hesi kunnu breiða seg út í náttúruna, men í flestum førum yvirliva tey ikki. Summi av sløgunum trívast tó væl, og stovnurin veksur skjótt. Tey hava ongan natúrligan fígginda á staðnum, og tí eru tey før fyri at troka tann natúrliga vøksturin og tað natúrliga djóralívið burtur. Hesi sløgini kunnu gerast innrássløg og gerast ein sera stór hóttan fyri tað lívfrøðiliga margfeldið á staðnum. Nýtt slag av krabbadýri, ið livir og nørist á alinótum, er helst innkomið við barlastvatni.

## Dorete Bloch heiðrað fyri framúr góða almenna miðlan



Á kvøldsetu á Vísindavøkuni 1. oktober 2012 varð avdúkað, at heiðurslønin fyri framúr góða almenna miðlan av gransking 2012 verður latin Dorete Bloch, professara í djóralívfrøði. Saman við heiðursbrævinum fylgdi ein kekkur upp á kr. 5.000.

Almenn og skipað miðlan av granskingarúrslitum er sera týdningarmikil fyri okkara fatan av gransking og av nyttuni, sum granskingin hevur fyri okkara gerandisdag. Í starvi teirra verða granskarar mettir eftir, hvussu dugnaligir teir eru at miðla vísindaliga. Hendan miðlanin er ofta til aðrar granskarar og ikki til almenningin. Tí er eisini neyðugt at kunna meira alment um gransking og granskingarúrslit. Tað er ikki altíð lætt, tí evnini ofta eru bæði umfatandi og torskild. Tað skulu tí serligir førleikar til at miðla alment.

## Hetta segði dómsnevndin:

*"Dómsnevndin letur miðlaheiðurslønina 2012 fyri serliga góða almenna miðling av gransking til Dorete Bloch. Við sínum óhátíðarliga lyndi og kveikjandi eldhuga hevur Dorete Bloch víst eini serlig evni til at byggja brýr millum okkara gerandislív og gransking á høgum stigi.*

*Í orðsins sanna týdningi hevur Dorete Bloch bustað støvið av granskingini, latið seg í gummistilvar og húgvu fyri at vera á staðnum við sínum livandi frásagnum um alt frá grindahvalum og skordjórum til haru- og plantulív.*

*Við fangandi framferð hevur Dorete Bloch rokkið hvørjum króki í landinum og ikki minst kveikt áhugan hjá okkum øllum fyri føroyskari gransking í øllum sínum fjølbroytni.*
*Og hetta er alt samstundis sum hon eisini hevur miðlað sína gransking vísindaliga, verið ritstjóri á tíðarritunum Fróðskaparrit, verið stovnsleiðari og luttikið í fleiri altjóða nevndum fyri Føroyar. Fyri alt hetta eigur Dorete Bloch at fáa ársins viðurkenning fyri at miðla gransking."*

# Úr virkseminum 2012

## Teljingar av drunnhvíta

Í juli og august 2012 vórðu drunnhvítar taldir í Urðini í Nólsoy. Hetta er fyrstu ferð, ein tílík teljing verður gjørd í Føroyum. Í ár var avgjørt at telja Hvíturð og suður móti Nýggjurð. Í økinum vórðu um 10% av flatuni tald og samlaða talið av reiðrum roknað út frá hesum. Drunnhvíti býr í holum og undir steinum og kann tí ikki teljast beinleiðis. Ístaðin verður eitt drunnhvítalát spælt, og tá kann drunnhvítin á reiðri svara. Økið var 106.000 m2,og drunnhvítalát bleiv spælt á umleið 5000 punktum. Úrslitið av teljingini gjørdist 4.679 (+/- 1.233) reiður.

## Grindahagtøl

Í 2012 løgdu 12 grindir upp á tilsamans 713 hval beinini í Føroyum. Fyrsta grindin varð hildin til í Trongisvági 16. mai og seinasta grindin var í Hvalba 27. november, tá ið tveir hval løgdu beinini. Størsta grindin var í Vági 8. september, hon taldi 195 hval. Grindirnar vóru mettar til tilsamans 4.961,5 skinn. Hetta gevur eitt miðal fyri hvalin upp á 7 skinn. Rokna vit við, at eitt skinn er 34 kg av spiki og 38 kg av tvøsti, so var samlaða nøgdin at skifta í 2012 góð 350 tons. Náttúrugripasavnið tók sýni frá teimum flestu grindunum.

## Grindamerking

Hin 2. oktober 2012 vórðu seks hvalir í eini grind upp á 35 hval merktir við fylgisveinamerkjum í Vági. Fyrstu vikuna eftir merkingina støðaðist grindin millum oyggjarnar, fyrst í Nólsoyarfirði, síðan norðuri í Sundalagnum og seinast á Skálafjørðinum, haðani grindin varð rikin aftur til havs. Tá vóru tríggir sendarar virknir. Grindin ferðaðist eftir hetta mest norðarliga í Hetlandsrennuni, 60-130 fjórðingar eystur úr oyggjunum. Tá ið ein mánaður var fráliðin, fór ein hvalur frá hinum og norður í Norskahavið, somu farleið sum merktir hvalir fyrr hava ferðast. Tá hvalurin var komin norður á 63. breiddarstig, slitnaði sambandið.



Tá ið tveir mánaðir vóru frálidnir síðan merkingina, byrjaðu hvalirnir at ferðast suðuryvir, og næsta mánaðin hildu teir leiðina heilt suður á 45. breiddarstig, t.e. 300 fjórðingar norður úr Asorunum. Hetta er fyrstu ferð, at merkingar hava staðfest, at grindahvalur á okkara leiðum ferðast har suður. Síðsta mánaðin, ið fylgt varð við grindini, støðaðist hon á Miðatlantsrygginum.



## Grindamerking í Hvalba

Hin 24. oktober 2012 merkti Náttúrugripasavnið eina grind í Hvalba. Við góðari hjálp frá hvalbingum gekst fyrimyndarliga væl at fara um og merkja grindina. Men tá ið grindin skuldi rekast út aftur, vildi hon ikki út. Hóast roynt varð at føra og reka hvalirnar útfrá, so trokaði grindin seg bara nærri og nærri sandinum. Tað var fjarandi sjógvur, og móti myrkri fjaraði grindin uppi. Tá Náttúrugripasavnið metti, at grindin neyvan fekst útaftur á lívi, vóru boð givin um, at hvalirnir kundu avlívast.

Ymsar umstøður gjørdu, at merkta grindin kom at liggja leingi á sandinum. Tá fólkið av Náttúrugripasavninum sá, at grindin var komin so langt út, at bátur sigldi innanfyri, varð mett, at farast kundi undir heimferðina norður um fjørðin. Hetta vísti seg kortini seinni at vera ein óheppin avgerð, tí um tað var bíðað, vóru boðini um at avlíva grindina helst givin fyrr. Samskifti var við sýslu-

mann og grindaformenn millum kl. 19 og 22. Náttúrugripasavnið fekk ikki fatan av, at støðan var so hættislig, at tað ikki bar til at síggja tíðina ann, fyrr enn um 21 tíðina, tá mett varð, at hvalir vóru doyggjandi ella deyðir.

Vónin hjá Náttúrugripasavninum var, at ein partur av grindini við merktu hvalunum kundi bjargast og fáast til havs aftur. Men sum frá leið skiltist, at støðan var ring, og at tað var lítið sannlíkt, at nakar hvalur yvirlivdi. Grindaformenn fingu boð um at avlíva allar hvalir, ið teir mettu máttu avlívast. Øll grindin varð síðani dripin. Náttúrugripasavnið harmast um, at merkingin fekk slíkan enda. Avleiðingin av tilburðinum var, at Náttúrugripasavnið endurskoðaði mannagongdir í sambandi við merking av hvali.



## Ein gomul kráka

Elsta ringmerkta kráka, ið vit higartil hava kent til, var í Sveis. Hon var ringmerkt, og ringurin avlisin 19 ár og 2 mánaðir, eftir at hann varð settur á hana. Nú hava vit avlisið ringin á einari kráku í Føroyum, sum var settur á hana 19 ár og 11 mánaðir frammanundan.

Tann 2. juni 1992 gingu Jens-Kjeld Jensen og Erik Mortensen runt um Toftavatn. Teir funnu eitt krákureiður við fýra ungum. Tað løgna var, at reiðrið var mitt á vøllinum, ikki langt frá einum spógvareiðri. Teir ringmerktu hesar fýra krákuungarnar, og ein av teimum fekk ring nr. 4234602.

Síðst í apríl í ár bleiv henda sama kráka funnin deyð við Rituvík. Hetta eru einans 3 km frá staðnum, har hon bleiv merkt sum ungi fyri næstan 20 árum síðan.

## Árinið av veðurlagsbroytingum á plantuvøkstur

Fyri stuttum fekk granskingarsamstarvið ITEX (International Tundra Experiment), ið hevur til endamáls at kanna sambandið millum vøkstur og veðurlag, grein í altjóða tíðarritið Ecology Letters. Greinin savnar 20 ára kanningar á 61 økjum kring heimin. Økini, ið eru kannað, eru skógarleys tundraøki í arktis og fjallaøki sunnanfyri.

Úrslitið frá kanningini vísir, at vøksturin í teimum ymisku økjunum fer at verða heilt ymiskt ávirkaður av upphiting. Í teimum mest viðbreknu økjunum fer árinið av langtíðar upphitingini á tundravøksturin og á alla vistskipanina helst at verða nógv størri, enn tað vit enn hava sæð.

Náttúrugripasavnið hevur eina støð uppi á Sornfelli, ið er við í samstarvinum. Har eins og á hinum støðunum verða kanningarnar gjørdar í smáum sekshyrntum vakstrarhúsum. Vakstrarhúsini gera, at hitin inni í teimum er øktur umleið 1ºC, og ber tað tí til at kanna, á hvønn hátt upphiting broytir vøksturin.

# Úr virkseminum 2012



## Kirkjubømúrurin í 2012

Varðveitingararbeiðini upp á Múrin í Kirkjubø hildu fram í 2012. Tá endalig støða í 2010 varð tikin til, at Múrurin skuldi varðveitast í tí líki, vit vita um, at hann hevur havt gjøgnum øldir - nevniliga sum toft - hevur seinnu árini verið arbeitt við at finna fram til tað slagið av mørtli, ið er hin best egnaði til varðveitingarendamálið, bæði tá tað snýr seg um styrki og útsjónd. Nú hesi úrslit eru rokkin, varð í 2012 farið undir sjálv konserverings-arbeiðini.

Meðan kanningar av ymiskum slagi hava staðið uppá, hevur múrverkið verið vart av eini fyribils veðurverju. Endamálið við henni var, at væta ikki longur slapp at seta inn í múrverkið, og at vindur-in inni undir henni turkaði váta mørtilin og múr-verkið upp. Veðurverjan hevur virkað sum ætlað. Tað hevur hon sýnt, meðan hon hevur staðið uppi.

Tá ið arbeiðini byrjaðu um miðjan apríl, varð farið undir at konservera 6 m av norðurmúrinum, bæði innan og uttan. Arbeiðið fevndi um útmúring av fugum, har mørtilin er dottin út, og festing av leys-um steinum. Eisini varð betongið, ið liggur oman á múrkrúnuni, tikið burtur, og í staðin varð ein kappi av bentonit, eitt slag av plastiskum leiri, lagdur omaná, sum so flag aftur varð lagt oman-yvir.

Og so hvørt sum múrverkið verður liðugt konser-verað verður veðurverjan tikin niður. Tað er múr-arafyritøkan hjá Birgiri Krossteig í Tórshavn, ið ger hesi arbeiði eftir vegleiðing frá fyritøkuni Nordisk Konservering í Raadvad norðan fyri Keypmanna-havn, sum í fleiri ár hevur arbeitt við og ment varðveitingartiltøkini í Kirkjubø saman við Forn-minnissavninum.

Ein liður í varðveitingararbeiðinum í 2012 var at gera bygningafornfrøðiligar skrásetingar, har dent-ur verður lagdur á at kanna arkitektoniskar og byggifrøðiligar spurningar fyri at staðfesta, hvørjir partar av múrverkinum eru eldri og hvørjir eru yngri. Bygningafornfrøðiligu skrásetingunum stóð Jónhild Johannessen, arkitektur, fyri í samstarvi Nidaros Domkirkes Restaureringsarbeider í Noregi. Símun V. Arge, leiðari á Fornminnissavnin-um, er verkætlanarleiðari.

## Fornfrøðilig granskingarverkætlan á Sondum heima á Sandi

Granskingarráðið játtaði í 2011-12 stuðul til eina verkætlan, sum hevði til endamáls at eftirviðgera tilfar, ið savnað varð undir fornfrøðiligu rannsóknunum 2006-07 av bústaðaleivdunum í bakkanum á fyrndarbýlinginum á Sondum heima á Sandi. Hesar rannsóknir fóru fram í millumtjóða verkætlanini "Heart of the Atlantic", ið byrjaði á Sandi 2003 og sum Fornminnissavnið stóð fyri. Við stuðlinum frá Granskingarráðnum hevur borið til at greina sýni av djóra- og plantufornfrøðiligum slag eins og av forngripum o.ø. Hesin tvørfakligi arbeiðsháttur hevur kravt eitt breitt toymi av granskarum, og Dr. Mike Church á universitetinum í Durham og Símun V. Arge, savnsleiðari, samskipaðu arbeiðið. Úrslitini verða almannakunngjørd sum sergreinar og í eini størri samanfatandi grein í altjóða tíðarritum í næstum.

## Hvalastøðin við Áir



Í 2012 varð farið undir at seta Tørkuna á hvalastøðini við Áir í stand. Hetta er tað fyrsta av teimum trimum størru húsum á støðini, sum skulu styrkjast og umvælast. Hini bæði eru Spikkókaríið og Ketilshúsið. Tørkan er ikki í so ringum standi sum hini bæði húsini, men her er eisini neyðugt at fara fram við varsemi.

Tey, sum hava landsvegin millum Hvalvík og Hósvík sum farleið, vita kanska, at Tørkan altíð hevur staðið uppi, stuðlað við spentum bardunum. Men tey flestu vita ikki, at tað hava verið nógvir lekar, og helst hevur altíð likið inn. Tað hevur sett síni spor. Tørkan hevur altíð verið á støðini, men hon fekk framkomna tøkni í árunum 1945-58, tá ið Pf. Sperm átti støðina. Seinni gjørdi Pf. Hvalarakstur eisini størri tekniskar broytingar. Tað kann hugsast, at ymist er tikið niður og burtur, tá ið tann nýggja útgerðin kom inn í Tørkuna. Í øllum førum er neyðugt at styrkja hana.

## Depilshúsini

Umvælingin av bóndahúsunum í Lon í Depli helt fram í 2012. Høvuðsarbeiðið var at umvæla og bjálva tekjuna. Tað regnaði illa í Depli, og tí varð riggað til ein tjaldyvirdekking. Tíverri kom fyrsta heystódnin longu 4. september, og hon fór illa við tjaldinum. Tað hevði við sær, at arbeiðið varð lagt stilt til komandi ár. Annað, ið gjørt varð í 2012, var at umvæla skorstein og gera takljós.

## Fornminnaskráseting

Í 2012 vórðu skrásetingar gjørdar av fornminnum í Kirkjubø, Oyndarfirði og á Velbastað. Skrásettar vórðu leivdir eftir fornum kirkjum og kirkjugørðum, ávikavist á Líkhúsi, í Prestbøtoft og Niðri á Bakka. Ein ástaðakanning var við Kirkjuvatn í Fámjin, har fráboðanir um jarðfest fornminni kundu staðfestast, og enn eitt ergi úr víkingatíð kundi setast á føroyakortið. So hvørt sum jarðfasti mentanarvurin verður talgildur, er GIS (Geographical Information System) vorðið eitt alsamt týdningarmeiri amboð at goyma, greina, kortleggja og framføra staðsettar dátur við. Sum liður í hesi gongd hevur Helgi D. Michelsen, fornfrøðingur, í 2012 m.a. førleikament seg innan GIS við at taka fakið "GIS for arkeologer" á lærda háskúlanum í Uppsala. Eisini er ein ambætari settur upp til at koyra forritið ArcGis Server. Hetta ger tað møguligt at deila og framføra tær staðsettu dáturnar gjøgnum internetið, bæði innanhýsis og út til almenningin.

# Úr virkseminum 2012

## Skjalasavnsdagur 2012

Í 2012 skipaði Landsskjalasavnið aftur fyri norðurlendskum skjalasavnsdegi. Endamálið við tiltakinum er at gera almenningin varugan við, hvørjum skjalasavnið arbeiðir við, m.a. við at hava opið hús. Tiltakið var leygardagin 10. nov. Leisturin var hin sami sum undanfarin ár: ein lítil framsýning og ein almennur fyrilestur. Evnið á tiltakinum og framsýningini hesaferð var "Navigare necesse est" "Brot úr føroysku bátasøguni". Fyrilestrarhaldari var Óli Olsen, ið helt fyrilesturin "Av bekki á skipabunka". Tiltakið fekk góða umrøðu í fjølmiðlunum, og umleið 40 fólk vitjaðu hendan dagin. John Kjær legði tiltakið til rættis.



## Jarðarbókin 1584

Hin 20. juli 2012 legði Landsskjalasavnið "Jarðarbókina 1584" út á netið til almenningin at lesa. Tað hava verið gjørdar fleiri royndir áður at fáa ta elstu varðveittu jarðarbókina útgivna, fyrstu ferð fyri meira enn 80 árum síðani og eisini í 1983, tá 300 ár vóru liðin síðani jarðarbókin varð til. Bókin, upprunaritið og avskriving síðu fyri síðu, er løgd út á heimasíðuna www.history.fo. Tiltakið fekk væl av umrøðu í fjølmiðlum. Tað er Arne Thorsteinsson, ið hevur granskað í tilfarinum, gjørt viðmerkingar og vegleiðingar, og Lisbeth L. Petersen hevur skrivað jarðarbókina av.



## Skjøl á mentanarnátt og vísindavøku

Landsskjalasavnið luttók í 2012 í Mentanarnáttini. Savnið hevði opið hús, har møguleiki var at síggja eina framsýning við millum øðrum Kongsbókini, løgtings- og vártingsprotokollum og øðrum viðvíkjandi tingum og tingstøðum. Nakað av fólki vitjaði hendan dagin. Lena Nolsøe og Sámal T.F. Johansen samskipaðu tiltakið.

Á Vísindavøkuni 2012 hevði Landsskjalasavnið opið hús við lítlari serframsýning um fátækraverkið í Føroyum í 18. og 19. øld. Eisini hevði Landsskjalasavnið eina lítla framsýning av ymiskum úrvaldum tilfari, víst fram í hølunum hjá Østrøm.



# Verkætlanir og millumtjóða samstarv

Søvnini luttaka í ymiskum millumtjóða samstørvum og verkætlanum.

## Norðurlendskt ríkisantikvarsamstarv

Ríkisantikvararnir í Norðurlondum hittast á árligum fundi at kunna hvønn annan um og tosa um felags viðurskifti. Í 2012 var fundurin hildin í Sogndal í Noregi í døgunum 4-6. juni. Andras Mortensen og Símun V. Arge luttóku.

## DEFF

Landsbókasavnið hevur samstarvssáttmála við DEFF, Danmarks Elektroniske Fag- og Forskningsbibliotek. Flestu bókasavnstænasturnar í E-feingi eru teknaðar hjá DEFF.

Erhard Jacobsen, leiðari á Landsbókasavninum, tekur sær av umsitingini av E-feingi og samstarvinum við DEFF.

## Ex Libris

Ex Libris er altjóða fyritøka, sum mennir og letur bókasavnsskipanir. Landsbókasavnið hevur sáttmála við Ex Libris um bókasavnsskipanina Aleph, sum bókasøvn kring landið brúka. Býarbókasavnið hevur tó egna bókasavnsskipan.

Erhard Jacobsen, leiðari á Landsbókasavninum, hevur umsitingina av bókasavnsskipanini um hendi.

## ISBN

Landsbókasavnið er føroysk ISBN-skrivstova og umsitur okkara landaøki í samstarvi við International ISBN Agency í London. Laura Vinther, leiðari á Tjóðbókaskránni, stendur fyri umsitingini av føroyska ISBN.

## NordINFOLIT

NordINFOLIT er norðurlendskt samstarv um gransking og menning av kunningarførleikum. Skipað hevur verið fyri sonevndum summarskúlum, eisini í Føroyum, um ymsar tættir í menning av kunningarførleikum, bæði tá talan er um einstaklingar og í vitanarstovnum. Í august 2013 skipar NordINFOLIT fyri 7. ráðstevnuni Creating Knowledge á lærda háskúlanum í Lund. Fyri Føroyar er Erhard Jacobsen, leiðari á Landsbókasavninum, umboð í stýrinum.

## Tíðarrit.fo

Tíðarrit.fo er eitt samstarv um talgilding av bløðum og tíðarritum í Føroyum, Grønlandi og Íslandi. Landsbókasavnið hevði ikki sjálvstøðuga játtan til Tíðarrit.fo í 2012.

## Nordisk-baltisk biblioteks-seminarium / konferens

Nordisk-baltisk biblioteksseminarium er eitt samstarv um bókasavnsspurningar millum norðurlendsku bókasavnsmyndugleikarnar. Ein ráðstevna var í oktober 2011, og ráðstevna verður aftur í september 2013. Erhard Jacobsen, leiðari á Landsbókasavninum, og Arnbjørn Dalsgarð, leiðari á Býarbókasavninum í Havn, fara á hesa ráðstevnuna, sum verður í Helsingfors.

## Nordiske Bogbind

Nordiske Bogbind er eitt norðurlendskt samstarv um eina framsýning av handinnbundnum bókaverkum. Sóleyg Kjærbæk, bókbindari á Landsbókasavninum, umboðar Føroyar í hesum samstarvi, og hon hevur sjálv innbundið eina bók til framsýningina. Framsýningin byrjar í 2013 og fer um øll Norðurlond. Í Føroyum verður hon í Norðurlandahúsinum frá 20. januar til 20. februar 2015.

## Norðurlendskir skjalasavnsdagar

"Nordiske Arkivdage", sum er serlig norðurlendsk arkivráðstevna, ið verður hildin 3. hvørt ár, var í 2012 í Tavastehus í Finnlandi. Á ráðstevnuni hevði Sámal T.F. Johansen fyrilestur undir heitinum 'Gen vs Arkiv – fordele og ulemper ved tværfagligt samarbejde', ið snúði seg um arbeiðið við at gera eina ættarbandsskrá fyri Føroyar í tíðarskeiðnum 2006-2012. Fyrilesturin legði dent á fyrimunir við hesum samstarvi millum Landsskjalsavnið og Ílegusavnið, men vísti eisini á nakrar av avbjóðingunum, ið liggja í einum tvørfakligum samstarvi, har partarnir ikki altíð hava somu áhugamál.

## ICA

International Council of Archives. Eingin fundur í 2012.

# Verkætlanir og millumtjóða samstarv

## Nordisk Arkivnyt

Samstarv um faktíðarrit viðvíkjandi arkivvirksemi. Eingin fundur í 2012.

## Skjalasøvn í útnorðri

Ráðstevnusamstarv millum arkiv í útnorðri. Eingin fundur í 2012.

## Netverk fyri stjórar á norðurlendskum tjóðsøvnum

Fundur var í Danmark 3.-4. september 2012. Andras Mortensen og Símun V. Arge luttóku.

## Nordic Baltic Mobility Network

Nordic Baltic Mobility Network er eitt samstarv millum norðurlendskar og baltiskar náttúrugripasavnsstjórar. Fleiri undirbólkar eru í samstarvinum. Í 2012 luttók Palli Askham á fundi í Riga í framsýningarbólkinum.

## "Fortsatte undersøgelser af grindehvalernes vandringer i Nordatlanten"

Verkætlanin hevur til endamáls at kanna ferðing og útbreiðslu hjá grind. Føroyingar hava eina aldagamla og siðbundna grindaveiðu. Spurningurin, um grindaveiðan er burðardygg, hevur tíðum verið reistur og viðgjørdur á altjóða arbeiðsfundum, og tá er eftirlýst meira vitan um atburð, ferðing og útbreiðslu hjá grind fyri at kenna, hvussu stórt økið er, ið grindahvalir við Føroyar koma frá. Úrslitini verða partur av vísindaligari meting av, um føroyska grindaveiðan er burðardygg. Náttúrugripasavnið varðar av verkætlanini, og verkætlanarleiðari er Bjarni Mikkelsen. Eisini luttekur Aarhus Universitet. Verkætlanin er fíggjað av danska Miljøstyrelsen.

## NSMMN

(North Sea Maritime Museum Network, ANSC) er eitt samstarv millum sjóvinnusøvn kring Norðsjógvin og sjóøki upp móti Føroyum. Endamálið við samstarvinum er at skipa fyri ráðstevnum og gera felags framsýningar. Ábyrgd í Føroyum: Erland Viberg Joensen.

## ITEX og GLORIA

Tvær altjóða granskingarverkætlanir, ið hava til endamáls at fylgja við í, hvussu veðurlagsbroytingar ávirka plantuvøkstur. ITEX (International Tundra Experiment, www.geog.ubc.ca) er eitt granskingarsamstarv millum lond á norðurhálvu, sum Náttúrugripasavnið luttekur í. Samstarvið hevur sum endamál at eftirgera veðurlagsbroytingar við smáum vakstrarhúsum og kanna árin av upphit-ing á plantuvøkstur. Ein støð bleiv sett upp á Sornfelli í 2001. Ábyrgd í Føroyum: Anna Maria Fosaa. GLORIA (http://www.gloria.ac.at) er eitt líknandi granskingarsamstarv, sum byrjaði í Europa í 90-árunum, men hevur nú breitt seg kring heimin. Samstarvið hevur til endamáls at fylgja við, í hvønn mun árinið av broyttum veðurlagi ávirkar plantuvøksturin.Verkætlanin byrjaði í 2009. Fýra fjallatindar eru partur av kanningini. Hetta er samstundis ein partur av okkara íkasti til tað arktiska samstarvið innan CAFF flora bólkin. Ábyrgd av verkætlanini í Føroyum: Anna Maria Fosaa.

## CAFF

(Conservation og Arctic Flora and Fauna) er arbeiðsbólkur undir Arktiska ráðnum. Bólkurin hevur til endamáls at arbeiða við skipanum um varðveitslu av tí lívfrøðiliga margfeldinum í arktis og á henda hátt tryggja eina burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum. CAFF er skipað við einum ráði (Management Board), har øll 8 limalondini luttaka. Føroyar hava eisini umboð í ráðnum, og seinastu árini hava vit ikki luttikið, men bert fylgt við í arbeiðnum. Ábyrgd í Føroyum: Anna Maria Fosaa.

Fleri fakundirbólkar eru undir ráðnum. Hesir bólkar hava til endamáls at samskipa samstarv millum vísindafólk og seta í gongd verkætlanir, hvørs endamál er at varðveita tað lívfrøðiliga margfeldið:

- CBird, ið er fuglabólkurin: Ábyrgd í Føroyum: Bergur Olsen, Havstovan.
- CFG (Caff Flora Group): Ábyrgd í Føroyum: Anna Maria Fosaa.
- Marine Biodiversity Monitoring Group. Ábyrgd í Føroyum: Jan Sørensen.

# Verkætlanir og millumtjóða samstarv

- Aquatic Biodiversity Monitoring Group. Ábyrgd í Føroyum: Leivur Janus Hansen.
- Terrestrial Biodiversity Monitoring Group. Ábyrgd í Føroyum: Anna Maria Fosaa.

## NOBANIS

(European Network on Invasive Alien Species) NOBANIS er eitt samstarv ímillum lond í norður- og miðevropa. Endamálið er at menna góð felags amboð til at basa og fyribyrgja innsløddum sløgum. Í hesum samstarvi verður savnað yvirlit yvir innslødd sløg, yvirlit yvir lógarverk og annað tilfar. Eisini verður kunning um vandamikil sløg framleidd.

## NABO

(North Atlantic Biocultural Organisation) NABO er eitt opið netverk fyri fornfrøðingar í Útnorðri, sí www.nabohome.org. Ábyrgd í Føroyum: Símun V. Arge.

## PAN

(Polar Archaeology Network) PAN er eitt netverk undir IASC (International Arctic Science Committee) sí www.iasc.info/home/networks/pan. Ábyrgd í Føroyum: Símun V. Arge.



# Greinar, frágreiðingar og luttøka

## Greinar

Arge, Símun V. and Natascha Mehler: Adventures far from home: Hanseatic Trading Stations at the Faroe Islands. In: Har now, H., D. Cranstone, P. Belford and L. Høst-Madsen (eds.): Across the North Sea: Later historical archaeology in Britain and Denmark ca.1500-2000 . 22-27 September 2009. Odense and Copenhagen 2012.

Arge, Símun V. und Natascha Mehler: Abenteuer in der Ferne: Der hansische Handel mit den Färöern. Tjaldur. Mittei lungsblatt des Deutsch-Färöischen Freundeskreise e. V. – Týskt-Føroyskt Vinafelag. Nr. 47/48/49. Mühlheim/Ruhr, Dezember 2012. Selbstverlag des Vereins, pp. 147-158.

Bloch, D. (2012). Beak tax to control predatory birds in the Faroe Islands. Archives of Natural History, 39(1), 126–135.

Bloch, D. (2012). Life History of Risso's Dolphin (Grampus griseus) (G. Cuvier, 1812) in the Faroe Islands. Aquatic Mam mals, 38(3), 250–266.

Elmendorf, Sarah; Henry, Greg; Bjorkman, Anne; Hollister, Robert; Björk, Robert; Callaghan, Terry; Collier, Laura; Cooper, Elisabeth; Cornelissen, Hans; Day, Thomas; Fosaa, Anna Maria; Gould, William; Grétarsdóttir, Járnger?ur; Harte, John; Hermanutz, Luise; Hik, David; Hofgaard, Annika; Jarrad, Frith; Jónsdóttir, Ingibjörg Svala; Keuper, Frida; Klanderud, Kari; Klein, Julia; Koh, Saewan; Kudo, Gaku; Lang, Simone; Loewen, Val; May, Jeremy; Mercado, Joel; Michelsen, Anders; Molau, Ulf; Myers-Smith, Isla; Oberbauer, Steven; Pieper, Sara; Post, Eric; Rixen, Christian; Ro binson, Clare; Schmidt, Niels; Shaver, Gaius; Stenström, Anna; Tolvanen, Anne; Totland, Orjan; Troxler, Tiffany; Wahren, Carl-Henrik; Webber, Patrick; Welker, Jeffrey; Wookey, Philip, 2012. Global assessment of experimental cli mate warming on tundra vegetation: hetero geneity over space and time. Ecology Letters, 15: 164-175.

Fosaa, A.M., Danielsen, O and Nyholm Debess, H. 2012. The influence of experimental warming on flowering phenology of Moss Campion, Silene acaulis. Fróðskaparrit. 59:104-112.

Hansen, J.F. 2012. Fjørðmaðkurin – maðkurin við teimum "grønu fingrunum". Frøði. 1/2012. Árg.17. p. 22-25.

Joensen, Erland Viberg: Del IV: Erhvervs- og næringsliv i tiden ca. 1550-1850 og Erhvervs- og næringsliv i tiden ca. 1850-2000. Erland Viberg Joensen (hjálparritstjóri): Ole Marquardt, Jón Þ. Þór, Daniel Tholeifsen, Guðni Th. Jóhan nesson og Nils Kolle. (159-245) (uml. 28 bls.)

Joensen, Erland Viberg: Del VI: Vestnorden i tre storkrige. Jón Þ. Þór (ritstjóri), Erland Viberg Joensen, Ole Marquardt og Daniel Thorleifsen. (363-394) (uml. 7 s.). Í: Jón Þ. Þór, Daniel Thorleifsen, Andras Mortensen og Ole Marquardt (red.): Naboer i Nord-atlanten. Færøerne, Island og Grønland. Hovedlinier i Vestnordens historie. Fróðskapur – Faroe Uni versity Press, Tórshavn 2012.

Mortensen, Andras o.a.: Del II: Opdagelsen af landene i Vestnorden; Saga og samfund; Kristendom og centralisering; Sen middelalderens nye rammebetingelser. (Pp. 45-112). Í: Jón Þ. Þór, Daniel Thorleifsen, Andras Mortensen og Ole Marquardt (red.): Naboer i Nord-atlanten. Færøerne, Island og Grønland. Hovedlinier i Vestnordens historie. Fróðskapur – Faroe University Press, Tórshavn 2012.

Rotander, A., Kärrman, A., van Bavel, B., Polder, A., Rigét, F., Auðunsson, G., Víkingsson, G., Gabrielsen, G., Bloch, D., Dam, M. 2012 c. "Increasing levels of long-chain perfluorocarboxylic acids in Arctic and North Atlantic marine mam mals, 1984-2009." Chemosphere 86, 278-285.

Rotander, A., van Bavel, B., Polder, A., Rigét, F., Auðunsson, G., Gabrielsen, G., Víkingsson, G., Bloch, D., Dam, M. 2012. "Polybrominated diphenyl ethers (PBDEs) in marine mammal from Arctic and North Atlantic regions, 1986-2009". Environment International 40, 102-109.

Rotander, A., van Bavel, B., Rigét, F., Auðunsson, G., Polder, A., Gabrielsen, G., Víkingsson, G., Mikkelsen, B., Dam, M. 2012 a. "Polychlorinated naphthalenes (PCNs) in sub-Arctic and Arctic marine mammals, 1986-2009." Environmental Pollution 164, 118-124.

Rotander, A., van Bavel, B., Rigét, F., Auðunsson, G., Polder, A., Gabrielsen, G., Víkingsson, G., Mikkelsen, B., Dam, M. 2012b. "Methoxylated polybrominated diphenyl ethers (MeO-PBDEs) are major contributors to the persistent orga nobromine load in sub-Arctic and Arctic marine mammals, 1986-2009". Science of the Total Environment 416, 482-489.

# Greinar, frágreiðingar og luttøka

## Frágreiðingar og álit

Halldórsson, G., Aradóttir, Á.L., Fosaa, A.M., Hagen, D., Nilsson, C., Raulund-Rasmussen, K, Skrindo, A.B., Svavarsdóttir, S., and Tolva nen, A. ReNo, Restoration of damaged Eco systems in the Nordic countries. TemaNord 2012:558.

Joensen, Erland V. o.o. (2012). Føroyskt bátasmíð. Álit um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi. Mentamálaráðið.

Mikkelsen, B., Bloch, D., Dam, M., and Desportes, G. Faroe Islands – Progress report on Marine Mammals 2012. Paper presented to the NAMMCO Scientific Committee, Tasiilaq, Greenland, April 2012. 6pp.

William Simonsen. (2012). Náttúran í Nólsoy. Tórshavn: Tórshavnar kommuna & Føroya Náttúrugripasavn.

## Luttøkur

Í sambandi við, at tað í ár eru liðin 20 ár síðan stóra ST ráðstevnan um umhvørvi og burðardygga menning varð hildin í Rio de Janeiro, Brasil, var Norðurlandahúsið 14. juni karmur um nøkur av evnunum frá RIO-umhvørvisráðstevnuni í 1992. Anna Maria Fosaa luttók við framløguni: Rio+20, lívfrøðiligt margfeldi.

Leivur Janus Hansen hevði framløgu á Ramsar COP11 í sambandi við, at Føroyar fingu handað váttan fyri, at Mykines, Nólsoy og Skúvoy eru útnevnd sum øki av altjóða týdningi.

Á ársfundinum hjá Grindamannafelagnum kunnaði Bjarni Mikkelsen um kanningarúrslit og framtíðar granskingarætlanir av grindahvali.

Fundur var í Íslandi um vakstrarkort av økinum Føroyar, Ísland og Suðurgrønland. Anna Maria Fosaa luttók.

Ramsar COP11 fundur í Bucharest. Leivur Janus Hansen luttók.

NAMMCO vísindaarbeiðsbólkurin um stovnsmetingar av hvali hevði fund í Reykjavík 10.-12. januar. Bjarni Mikkelsen luttók.

Ársfundurin hjá NAMMCO vísindanevndini var hildin í Tasiilaq 19.-22. apríl. Bjarni Mikkelsen luttók.

NAMMCO ráðið helt ársfund í Svolvær 11.-13. september. Bjarni Mikkelsen luttók.

Villblómudagin skipaði Náttúrugripasavnið fyri einum túri fyri almeninginum niðan á Sornfelli.

Ámundur Nolsø gjørdi fýra stuttfilmar um undirsjóvarlívið á Havnarvág. Teir hava verið vístir regluliga sum millumsendingar í Kringvarpi Føroya. Filmarnir eru partvíst stuðlaðir av Tórshavnar kommunu.

- Vágsbotnur, longd 9:49 min.
- Sandagerði, longd 7:43 min.
- Við Skipasmiðjuna og Rættará, longd 7:27 min.
- Taraskógurin, longd 14:11 min.

Birna Vár Trygvadóttir luttók á vísindaráðstevnuni The 12th International Symposium on Tardigrada, sum varð hildin í Vila Nova de Gaia í Portugal í døgunum 23.-26. juli 2012, har hon eisini hevði eina munnliga framløgu við heitinum: Eohypsibiidae (Eutardigrada, Tardigrada) and other records from the Faroe Islands.

Nordic Baltic Mobility Network, undirbólkur fyri framsýningar. Palli Askham luttók á fundi í Riga í 2012.

Jan Sørensen luttók á "2nd International Symposium on the Biology of the Sipuncula" (4-8 juni 2012, Fort Pierce, Florida) við fyrilestri við heitinum "The distribution of sipuncula species in the high Northeast Atlantic".

Erland Viberg Joensen tók lut í ráðstevnu í Bergen 6.-8. juni 2012 um " Sjømat og kulturarv", har hann helt framløgu um hvalastøðina við Áir.

Erland Viberg Joensen stóð fyri føroyska partinum í felags framsýning hjá netverkinum ANSC undir heitinum "Maritime People then and now".

Símun V. Arge luttók í "Post-excavation and publication of archaeological excavations at Á Sondum, Sandoy: Detailed research design", sum verður stjórnað av Símuni V. Arge í samstarvi við Dr. Mike Church, Durham University, UK. Verkætlanin er liður í "Heart of the Atlantic"verkætlanini, ið fer fram í Sandoy, og varð fíggjað av Granskingarráðnum 2011-2012.

Símun V. Arge byrjaði samstarv við Dr. Cathy Batt, Bradford University, í sambandi við verkætlanina: "Viking Chronologies", ið hevur til endamáls at kanna náttúruvísindaligar tíðarfestingar frá fornfrøðiligum rannsóknum á støðum, har norðbúgvar settu búgv í Útnorðri – sí bloggin: http://blogs.brad.ac.uk/bradford-vikings/. Verkætlanin er fíggjað av British Academy.

Símun V. Arge luttók í nýstovnaðum "Garðar Advisory Board", ið er ráðgevandi nevnd samansett av serkønum úr Grønlandi, Danmark, Íslandi og USA, í sambandi við fyriskipan av varðveitingartiltøkum av fornminnunum á miðaldar bispasætinum á Gørðum í Suðurgrønlandi. Grønlendska tjóðsavnið í Nuuk stendur fyri varðveitingararbeiðinum.

Løgmansgáva til norska forsætisráðharran. Hin 17. og 18. mai 2012 vitjaði norski forsætisráðharrin Jens Stoltenberg í Føroyum. Í hesum sambandi læt løgmaður Kaj Leo Johannesen norska forsætisráðharranum eina serliga gávu, ið skuldi ímynda søguliga knýtið landanna millum. Talan var um eina serliga avmyndan av fyrstu opnu í Seyðabrævinum, sum Landsskjalasavnið hevði gjørt og latið sett í rammu. Sámal T.F. Johansen stóð fyri hesum.

Í 2010 varð Sámal T.F. Johansen boðin við í eina granskingarverkætlan undir heitinum "Housing in the Arctic". Hetta er eitt samstarv millum Universitetið í Grønlandi, Háskóla Íslands, Landsskjalasavnið, Granskingardepilin í Apatity og Roskilde Universitetscenter. Eins og undanfarnu árini var fundur í hesum bólki í 2012, har luttakararnir høvdu framløgu fyri hvørjum øðrum. Fundurin var hesaferð í Stockholm. Væntandi kemur ein skrivlig frágreiðing frá hesum bólki í 2013. Ferðing og fundarvirksemi í sambandi við hesa verkætlan varð goldið av norðurlendskum stuðli.

Urbanization in the Arctic. Hin 28. til 30. august 2012 var "The First International Conference on Urbanisation in the Arctic" hildin í Nuuk. Á hesi ráðstevnu helt Sámal T.F. Johansen fyrilestur undir heitinum "The history of urbanization and Urban Planning in the Faroes – the case of Tórshavn". Ferðing og fundarvirksemi í sambandi við hesa verkætlan verður goldið av norðurlendskum stuðli.

Helgi D. Michelsen luttók í verkstovu í Wien 25.02.-01.03.2012: „Geophysical Prospection", fyriskipað av Ludwig Boltzmann Institut/IC-Archpro í Wien.

Símun V. Arge luttók 6. mars á samskiparafundi á Riksantikvaren í Oslo í sambandi við ríkisantikvarfundin í Noregi í juni.

Andras Mortensen og Símun V. Arge luttóku á norðurlendska ríkisantikvarfundinum, hildin á Wallaker Hotel í Solvorn, Noregi, 04.-06.06.

Í døgunum 29. august til 2. september luttóku Símun V. Arge og Helgi D. Michelsen á European Archaeological Association Annual Meeting/ Medieval Europe Conference – Helsinki. Símun hevði framløgu: "Coastal Erosion – a Threath against Cultural Heritage in the Faroe Islands".

Í døgunum 4. til 6. september luttóku Andras Mortensen og Símun V. Arge á Norðurlendska Tjóðsavnsstjórafundinum, hildin á Nationalmuseet í DK við kunningarferðum og vitjanum til Eremitageslottet, Brede Wærck, Frilandsmuseet,

# Greinar, frágreiðingar og luttøka

Trelleborg, Ravning Enge og Jelling.
Súsanna Joensen luttók á ársfundi hjá Nordisk Konservator Forbund í Oslo 15.-17. oktober.

Í døgunum 23.-27. oktober luttóku Andras Mortensen, Símun V. Arge, Erland Viberg Joensen og Jan Sørensen í kunningarferð í stýringsbólkinum við atliti at varðveitingini av hvalastøðini við Áir:
Vitjaðu Fiskeri- og søfartsmuseet í Esbjerg, sjófartssavnið í Flensborg, tigilsteinasavnið Christinesminde við Broager og hvalasavnið í Sandefjord í Noregi.

13. september luttóku Erland Viberg Joensen og Símun V. Arge á seminari í Porkeri: "Livandi Savn í Porkeri", saman við luttakarum úr Útnorðri og Noregi.

Hákun Andreasen var á verkstovu viðv. talgildu skrásetingarskipanini RegFo í døgunum 26.-27. november, ið var fyriskipað av Organisationen Danske Museer í Keypmannahavn.



## Minningarorð

Haldane Joensen

Tann 31. januar 2012 andaðist Haldane Joensen, Haldin, sum hann varð nevndur. Hann varð føddur í Havn tann 9. desember 1938. Mamman var Ingrid Hjørdis Margretha Isaksen. Hon vaks upp í Hull í Onglandi, og pápin var Albert Absalon Joensen, skipari, ið seinni var kendur havnarumsjónarmaður hjá Tórshavnar havn. Tey fyrstu árini búðu tey í Tórsgøtu og fluttu í seinnu helvt av 1940-árunum í Hornabø at búgva. Haldin og tey vóru seks systkin.

Í 1945 fór hann í Kommunuskúlan og tók realskúlaprógv í 1955. Síðan fór Haldin út í lívið at arbeiða fyrifallandi við eitt nú lossing, landing og fiskaarbeiði á bæði Eystaru- og Vestaruvág. Fimmtiárini vóru trupul ár, og Haldin royndi seg sum frægast við lønandi arbeiði. Somuleiðis arbeiddi hann á Tunnuvirkinum og var eisini nógv í byggivinnuni. Hann royndi seg eisini sum skúlavikarur í Mykinesi og í Hesti.
Hann hevði nógvar gávur og eitt óvanliga gott minni. Sum ungur spældi Haldin til dans og var virkin í tónleikalívinum í býnum. Haldin kendi nógv fólk og hevði samband við nógv fólk, og í sínum nógvu fjølbroyttu arbeiðum í 1950-, 1960- og 1970-árunum fekk hann høvi at eygleiða samfelagið frá fleiri síðum. Eitt nú tosaði hann ofta um umstøðurnar hjá tí arbeiðandi fólkinum, og ikki minst um hendingar leiðini, ið høvdu fest seg. Tað var lætt hjá honum at seta fólk saman í ymisk høpi, og vert er her at nevna, at hann visti væl um ættir, sambond og skyldskap. Fremst hjá honum var móðirættin, ið hevur røtur í Norðuroyggjum.

Sum tilkomin fekk Haldin prógv sum tekniskur assistentur og var í nøkur ár í starvi á teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu. Her kom hansara góða minni honum og kommununi til góðar. Væl kendi hann sín heimbý, og stóran tokka hevði hann til náttúruna.

Haldin kom rættiliga seint inn í savnsverðina. Í 2001 kom hann í eitt fyribilsstarv á Føroya Fornminnissavni. Haldin var tekniskt forvitin og varð settur at arbeiða við myndum og myndasøvnum savnsins. Tað var skjótt, at tað sást, at tað var dugur í honum, og tí gjørdi leiðslan av at seta Haldin í fast starv. Tað mesta av tíðini fekst hann við skanning og viðgerð av myndum, og á skrivstovuni fyltist skjótt við fólki, ið komu uttanífrá at leita sær hjálp hjá honum. Men væl dugdi hann eisini at fáa vitan frá teimum vitjandi. Hann fór frá fyri aldur við árslok 2008.

Tað er ikki sum at siga tað at fáast við søguligar myndir. Haldin var í so góðari venjing, at hann alt fyri eitt kundi siga, hvørji fólkini á myndini vóru, hann sat við. Sunnanfjørðs, norðanfjørðs, tað gjørdi tað sama, og ivaðist hann, setti hann seg í samband við sítt netverk og síni heimildarfólk.

Tey síðstu arbeiðsárini arbeiddi hann hálva tíð, men kortini við sama eldhuga og ágrýtni. Teldan, skannarin, øll útgerðin hjá Haldin er sløkt. Tað er stórur saknur í honum. Vit minnast í takksemi hansara stóra avrik fyri stovnin. Tær uppgávur, hann loysti, koma okkum væl við í okkara arbeiði.

# Hagtøl

## Vitjanir á framsýningum

### Vitjanir 2012, vaksin, børn og næmingar

| | Til samans | Vaksin | Børn | Næmingar |
|---|---|---|---|---|
| Fornminnissavnið, Brekkutún | 6.017 | 3.735 | 1.599 | 683 |
| Náttúrugripasavnið, Debesartrøð | 2.847 | 1.464 | 921 | 462 |
| Hoyvíksgarður | 2.913 | 1.372 | 1.187 | 354 |
| Dúvugarðar | 2.284 | 2.225 | 59 | - |
| Til samans | 14.061 | 8.796 | 3.766 | 1.499 |

### Vitjanir 2012, føroyingar og útlendingar

| | Til samans | Føroyingar | Útlendingar |
|---|---|---|---|
| Fornminnissavnið, Brekkutún | 6.017 | 3.099 | 2.918 |
| Náttúrugripasavnið, Debesartrøð | 2.847 | 2.064 | 783 |
| Hoyvíksgarður | 2.913 | 2.073 | 840 |
| Dúvugarðar | 2.284 | 137 | 2.147 |
| Til samans | 14.061 | 7.373 | 6.688 |

### Vitjanir seinastu 5 árini

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fornminnissavnið, Brekkutún | 7.998 | 6.912 | 7.013 | 5.608 | 6.017 |
| Náttúrugripasavnið, Debesartrøð | 4.805 | 4.868 | 3.980 | 3.340 | 2.847 |
| Hoyvíksgarður | 2.848 | 1.245 | 1.622 | 1.329 | 2.913 |
| Dúvugarðar | | 2.475 | 2.989 | 2.858 | 2.284 |
| Til samans | 15.651 | 15.500 | 15.604 | 13.135 | 14.061 |

## Starvsfólk, ársverk í 2012

| | Løgtingsfíggjarlóg | Inntøkufíggjað virksemi | Ársverk | Pct |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisiting | 4,5 | | 4,5 | 9% |
| Landsbókasavnið | 16,4 | | 16,4 | 34% |
| Landsskjalasavnið | 4,1 | 0,5 | 4,6 | 9% |
| Náttúrugripasavnið | 7,9 | 6,4 | 14,3 | 29% |
| Fornminnissavnið | 8,9 | | 8,9 | 18% |
| Til samans | 41,8 | 6,9 | 48,7 | 100% |

# Hagtøl

## Søvn Landsins, journalmál 2012

| | Tal av stovnaðum málum | Skriv inn | Skriv út |
|---|---|---|---|
| Fyrisiting | 127 | 341 | 315 |
| Landsbókasavnið | 69 | 117 | 154 |
| Landsskjalasavnið | 74 | 202 | 156 |
| Fornminnissavnið | 103 | 311 | 126 |
| Náttúrugripasavnið | 61 | 70 | 53 |
| Til samans | 434 | 1041 | 804 |

## Landsskjalasavnið, skrásetingar og avgreiðslur

Landsskjalasavnið hevur eftirlit við journal- og arkivviðurskiftum hjá almennum og kommunalum myndugleikum. Í talvuni er yvirlit yvir eftirlitsvitjanir 2006-2012:

| Ár | Tal |
|---|---|
| 2006 | 11 |
| 2007 | 14 |
| 2008 | 19 |
| 2009 | 19 |
| 2010 | 17 |
| 2011 | 15 |
| 2012 | 19 |

## Landsskjalasavnið, skrásetingar av søvnum á goymslu

| | | |
|---|---|---|
| Móttiknar avhendingar | 18 stk. | 105 hillametrar |
| Stovnað søvn (arkiv) | 91 arkiv | 1.159 savnindaeindir skrásettar í 2012 |

## Landsskjalasavnið, umsóknir um atgeingi

| | Játtað | Noktað | Til samans |
|---|---|---|---|
| Umsóknir til granskingarendamál o.tíl. | 5 | 0 | 5 |
| Persónlig upplýsing | 6 | 2 | 8 |
| Til samans | 11 | 2 | 13 |

## Landsskjalasavnið, lesistova, útlán og fyrispurningar

| | Persónar | Eindir |
|---|---|---|
| Vitjandi | 897 | |
| Harav bólkar | 4 | |
| Útlán – savnindi | | 1724 |
| Fyrispurningar (ranns. og vegl.) | | 197 |
| Útlán til stovnar | | 129 |

## Bókasøvn 2012

| | Bókasøvn | Bókatal | Útlán |
|---|---|---|---|
| Fólkabókasøvn | 21 | 328.046 | 168.730 |
| Landsbókasøvn | 1 | 174.092 | 23.590 |
| Bókasøvn á Fróðskaparsetrinum | 2 | 46.000 | |
| Skúlabókasøvn | 11 | 180.422 | 55.840 |
| Serbókasøvn | 12 | 81.745 | |
| Til samans | 47 | 810.305 | 248.160 |

## Bókasavnsgjald og fólka- og skúlabókasøvn

Játtanin til fólka- og skúlabókasøvn var 4,1 mió. kr. í 2012. Av hesum vóru 1,1 mió. avsettar til bókasavnsgjald, ið er samsýning til rithøvundar fyri nýtslu av bókum teirra á bókasøvnunum. Játtanin til rithøvundar var sundurbýtt millum 246 høvundar og týðarar.

Játtanin til fólka- og skúlabókasøvn varð sundurbýtt sum í talvuni. Stuðul verður latin eftir góðkendari fíggjarætlan. Í yvirlitinum sæst, at virksemið er væl størri enn stuðulsjáttan er til. Soleiðis hevur verið í mong ár, og hetta ger, at skipanin er fastlæst, soleiðis at skilja, at fólka- og skúlabókasøvn, ið víðka virksemi sítt, fáa ikki stuðul til víðkanina, og at øll søvn verða stuðlað við samsvarandi upphædd í mun til játtanina sum var árið fyri. Um allar rakstrarútreiðslur vórðu stuðlaðar, hevði játtanartørvurin í 2012 verið umleið 5,5 mió. kr.

| Bókasavn | Roknskapur 2012 | Góðkend ætlan 2012 | Stuðul 2012 | Stuðul í mun til roknsk. pct | Stuðul eftir góðk. ætlan, pct |
|---|---|---|---|---|---|
| Bókasavnið við Løkin | 632.025 | 142.043 | 56.817 | 9% | 40% |
| Býarbókasavnið | 7.489.541 | 3.387.059 | 1.404.695 | 19% | 41% |
| Felagsskúlin á Oyrarbakka | 79.265 | 58.191 | 32.310 | 41% | 56% |
| Fuglafjarðar bókasavn | 785.061 | 448.379 | 179.351 | 23% | 40% |
| Bókasavnið í Eysturkommunu | 367.810 | 246.249 | 113.784 | 31% | 46% |
| Hvalbiar skúlabókasavn | 35.636 | 26.206 | 15.723 | 44% | 60% |
| Hvalvíkar bóksavn | 154.557 | 115.892 | 46.357 | 30% | 40% |
| Klaksvíkar bókasavn | 1.782.257 | 1.295.425 | 523.045 | 29% | 40% |
| Kvívíkar skúlabókasavn | 157.437 | 153.111 | 70.640 | 45% | 46% |
| Nes bókasavn | 198.823 | 122.157 | 52.334 | 26% | 43% |
| Sandoyar meginskúli | 58.770 | 66.823 | 31.571 | 54% | 47% |
| Sands bókasavn | 179.412 | 154.248 | 61.699 | 34% | 40% |
| Stranda bókasavn | 203.850 | 97.150 | 44.863 | 22% | 46% |
| Sunda bókasavn, Oyrarbakki | 242.240 | 138.106 | 55.243 | 23% | 40% |
| Sørvágs bókasavn | 146.429 | 92.919 | 37.168 | 25% | 40% |
| Tvøroyrar bókasavn | 132.550 | 109.913 | 47.851 | 36% | 44% |
| Vága bókasavn | 166.398 | 124.657 | 52.334 | 31% | 42% |
| Vágs bókasavn | 316.395 | 265.521 | 112.107 | 35% | 42% |
| Vestmanna bókasavn | 148.178 | 126.281 | 57.782 | 39% | 46% |
| Til samans | 13.276.632 | 7.170.329 | 2.995.674 | 23% | 42% |

# Hagtøl

## Bygdasøvn

Stuðulin til bygdasøvn í 2012 var soleiðis sundurbýttur:

| | |
|---|---|
| Sumbiar Sóknar Bygdasavn | 0 |
| Vágs Bygdasavn | 61.929 |
| Porkeris Bygdasavn | 68.018 |
| Fornminnisavnið á Mýri | 10.173 |
| Tvøroyrar Bygdasavn | 182.713 |
| Sands Bygdasavn | 112.745 |
| Skopunar Bygdarsavn (ikki virkið) | 0 |
| Sandavágs Bygdarsavn (ikki virkið) | 0 |
| Miðvágs Bygdasavn | 122.889 |
| Sørvágs Bygdasavn | 23.436 |
| Nólsoyar Bygdasavn | 11.524 |
| Vestmanna Bygdasavn | 30.104 |
| Kollafjarðar Bygdasavn | 62.475 |
| Tórshavnar Býarsavn | 58.355 |
| Sjóvar Fornminnasavn | 283.640 |
| Eiðis Bygdasavn | 99.773 |
| Leirvíkar Bygdarsavn (ikki virkið) | 0 |
| Gøtu Bygdasavn | 176.196 |
| Bygdasavni "Forni", Glyvrum | 311.560 |
| Nes sóknar Bygdasavn | 131.876 |
| Norðoya Fornminnisavn | 759.180 |
| Til samans | 2.506.586 |

## Onnur stuðulsveiting

Søvn Landsins umsita ymsar stuðulsskipanir hjá landinum.

| | | |
|---|---|---|
| Ljóðbókaframleiðsla | 524.000 | Stuðulsmóttakari: Forlagið Føroyskar Ljóðbøkur |
| Sjósavn | 300.000 | Stuðulsmóttakari: Sjósavnið á Argjum |
| Listasøvn | 126.000 | Stuðulsmóttakarar: Norðoya Listasavn, Listasavnið á Sandi, Skálin við Skálá, Vági |

## Heimasíðuhagtøl

Søvn Landsins hava enn ikki til fulnar samskipað heimasíður sínar. Vitjanarhagtølini á heimasíðunum vóru í 2012 sum í talvuni:

| | Vitjanir | Síður | Síður í miðal pr. vitjan |
|---|---|---|---|
| savn.fo | 13.206 | 211.989 | 16,1 |
| flb.fo | 42.000 | 156.000 | 3,7 |
| history.fo | 28.250 | 1.531.276 | 54,2 |
| fornminni.fo | 26.796 | 133.203 | 5,0 |
| ngs.fo | ? | ? | ? |
| Til samans | 68.252 | 1.876.468 | 18,4 |



STEPHANSSONS HÚS 210803